Birgir Kruse

# FJØLMIÐLAR




Føroya Skúlabókagrunnur 2007 - www.fsg.fo > Teldutøkt tilfar > Fjølmiðlar

# *Formæli*

Tað, ið vit lesa, hoyra og síggja í fjølmiðlunum er tíðarbundið. Rolling Stones spurdu í 1966: “Who wants yesterday’s papers?” og skundaðu sær longu í sama sangi at svara “Nobody in the world!”



*Birgir Kruse við “Sticky Fingers” hjá Rolling Stones í hondini. Tænarin tók myndina á samnevndu matstovuni hjá bassleikaranum Bill Wyman í London.*

Hyggja vit nærri at hesum einfalda sangi, sum var hin fyrsti, Mick Jagger yrkti, so varnast vit nakað, ið var alment viðkomandi tá, eins og nú. Tað er staðfestingin av, at vit liva í einum støðugt skiftandi heimi: “I’m living a life of constant change/Every day means a turn of the page.”

Hetta eru korini, fjølmiðlarnir liva undir, og hetta eru korini, vit sum brúkarar mugu læra okkum, skulu vit skilja miðlarnar. Hvør dagur er eitt nýskrivað blað. Og dagin eftir blaða vit upp á eina nýggja síðu. Uttan at fáa Sticky Fingers ella feittutar pedagogfingrar, sum eg plagi at kalla tað, tá tilfarið verður tyngri enn neyðugt, bert tí at tað er skúlatilfar.

Hesin tekstur um fjølmiðlar byggir á bókina ”Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið”, sum Petur Ove Petersen skrivaði, og Føroya Skúlabókagrunnur gav út í 1996. Støðið er tikið í kapitlinum um fjølmiðlar, bls. 57-64.

Við loyvi frá rithøvundanum og ritstjóranum, Niels Petersen, havi eg dagført henda stutta kapittul og skoytt nakað uppí, har sum eg havi hildið tað vera neyðugt. Eitt nú um talgilda útgerð, telduspøl og ávirkan, um pressufrælsi og skiftið frá at skriva journalistiskt til at gera skrivingina til list.

Leiðorðini til vinstru á hvørjari síðu, eru hugtøk og viðurskifti, ið lærararin eigur at kunna seg við innan undirvíst verður. Í hvørjum kapitli eru serlig kjakevni at taka upp í flokkinum. At enda eru uppskot um uppgávur, sum lærarin kann fylgja, ella bara brúka sum íblástur til egið arbeiði saman við næmingunum.

Lagt verður upp til at lesa bløðini, lurta eftir útvarpi og hyggja eftir Degi og Viku. Eisini er umráðandi at kunna seg við pressufrælsi, her og úti í heimi, serliga í Russlandi. At enda eru eisini uppgávur, har spælifilmur verður borin saman við staðfestar hendingar og veruligar fjølmiðlar. Hetta eru krevjandi uppgávur, sum nógv kann fáast burturúr á miðlabreyt og miðnámi.

Hetta tilfar um fjølmiðlar er fyrst og fremst ætlað at brúka á miðlabreyt í 10. flokki. Tilfarið kann tó eisini brúkast á miðnámi og í elstu flokkum fólkaskúlans í søgu/samtíð og føroyskum. Teksturin kann lættliga dagførast, rættast og víðkast. Eru nakrir feilir íkomnir, eru teir bara mínir egnu.

Eg takki fyri loyvi at brúka uppruna-tekstin, LMS-lærugreinaráðgevanum, Paula Hansen, fyri viðmerkingar, Øssuri Winthereig fyri fakligan rættlestur, Borghild Sjúrðaberg fyri málsligan rættlestur, Óla P fyri tekningar, sum Jón Einarsson á Sosialinum litprýddi, Emil Jacobsen, ið fann myndir á Dimmalætting, Jónu Dalsgarð og Benny Brockie fyri myndir úr sjónvarpinum og Ole Wich fyri uppsetingina og góð ráð. Myndirnar tók eg sjálvur, er ikki annað viðmerkt.

*Birgir Kruse, ritstjóri*
*Á halvarðsøku 2007*

# *Innihaldsyvirlit*

| | |
|---|---|
| Formæli | 2 |
| Fjølmiðlar | 4 |
| Samskifti – hvat er tað? | 6 |
| Sjónvarp | 9 |
| Tíðindi elva til kjak | 10 |
| Alment og privat | 13 |
| Orð og myndir sum vápn? | 14 |
| Tíðindastovur | 15 |
| Á føroyskum – ella donskum? | 16 |
| Inntøkur | 19 |
| Fjórða samfelagsmaktin | 21 |
| Handilsvøra | 22 |
| Samanrenning | 25 |
| Fjølmiðlar ávirka okkum | 26 |
| Dreingir skjóta í Føroyum | 28 |
| Vit verða eins og hini | 29 |
| Íbundin ella avkrøkt? | 32 |
| Hvørji árin hava fjølmiðlar á samfelagið? | 35 |
| Miðlarnir savna áhugan – og pening | 37 |
| Harðskapur í fjølmiðlunum | 39 |
| Lýsingar og fjølmiðlar | 42 |
| Virði og hugburðir koma ikki av sær sjálvum | 43 |
| Sannleikin doyr fyrst | 45 |
| Veruleikin ritstýrdur | 47 |
| Talufrælsi og sensur | 50 |
| Veruleikin sum listagrein | 52 |
| Framtíðin | 54 |

| | |
|---|---|
| Spurningar og uppgávur: Bløðini | 56 |
| Spurningar og uppgávur: Kringvarp Føroya, útvarpsparturin | 57 |
| Spurningar og uppgávur: Kringvarp Føroya, sjónvarpsparturin | 59 |
| Spurningar og uppgávur: Skjót journalistin | 61 |
| Spurningar og uppgávur: Public service | 63 |
| Spurningar og uppgávur: Filmar og miðlar | 64 |

| | |
|---|---|
| Tilfar og keldur | 66 |
| Blaðgreinar | 66 |
| Bøkur og frágreiðingar | 67 |
| Filmar | 68 |
| Heimasíður | 69 |
| Leitorð | 69 |

# *Fjølmiðlar*

**fyrimynd**

Í innandura fótbólti er sera vanligt, at liðini hava nøvn eftir teim stóru, so sum Barcelona, Manchester United og Liverpool. Teir lítlu spælararnir, og kanska eisini teir, ið eru eitt sindur størri, hava onkran á hesum kendu liðunum sum fyrimynd. Myndir av teimum síggjast í bløðunum, og ofta eru teir at síggja á sjónvarpsskíggjanum.



*Føroya størsta fótbóltsstjørna er Tódi Jónsson. Eftir loknan landsdyst móti Kekkia í Prag í 1999, vilja allir miðlar hitta hann á máli. Útvarpsmikrofonin er mitt fyri. Mynd: Allan Brockie.*

**tónleikarbólkur**
**sjónvarp**
**útvarp**

Tey, sum spæla í tónleikabólkum kring landið, hava eisini síni orkestur sum fyrimynd. Tónleikabólkar eru eisini ofta at síggja í bløðum og í sjónvarpi. Og sjálvandi eru teir at hoyra í útvarpi.








*Tvey føroysk Bronx radio hjá Tema Radio í Havn. Bronx hevur navn eftir Jónas Broncksgøtu í Havn. Tá rock and roll kom til Føroya í 1956 seldi Bronx plátur og heimagjørd radio niðast í Tórsgøtu, har Hvonn er í dag. Mynd: Birgir Kruse*

**fartelefon** **Ipod** **mp3**

*Í fartelefonum, iPod og Mp3 útgerð kanst tú lurta eftir tí tónleiki, ið tær hóvar, á veg í og úr skúla. Í heimatelduni kanst tú leita á internetinum, kjakast og finna svar upp á spurningar, tá tú skrivar verkætlanar-uppgávu. Samstundis kanst tú eisini skriva teldupost beint til læraran ella vinfólk og spyrja um ráð.*

**fila** **geymi**

Tá vit skriva á teldu, goyma vit tekstin í eini fílu. Á sama hátt kunnu vit goyma tónleik og film í eini fílu. Fíluna kunnu vit flyta. Vit kunnu bera hana við okkum í einum geyma ella senda onkrum øðrum hana.

**podcast**

Podcast er enn ein máti at flyta eina fílu frá einum staði til ein annan. Útvarpið, sum bjóðar hesa tænastu, sigur soleiðis á heimasíðuni um podcast:

**podcast tíðindi**

*Kringvarp Føroya er nú farið undir at royndarkoyra Podcast. Í fyrsta umfari er tað bert møguligt at fáa tíðindasendingarnar umvegis Podcast. Fyri at móttaka podcast, mást tú hava eitt forrit til hetta endamál. Mest brúkta forrit í løtuni er, iTunes, www.apple.com. Eitt annað Juice, http://juicereceiver.sourceforge.net. og tað eru nógv onnur forrit, ið eisini kunnu móttaka podcast. Um tú hevur iTunes, so er bert at trýsta á leinkjuna undir beinleiðis leinkjur til iTunes. Um tú hevur onnur forrit, so skalt tú kopiera leinkjuna, ið stendur undir Podcasting, ið er tøk frá Kringvarpinum, og leggja leinkjuna inn í títt podcast forrit www.uf.fo.*

*(www.uf.fo)*




*Í bretskum skúlum verður podcast brúkt í undirvísingini. Foto: Birgir Kruse*



***Man hon hoyra Útvarpið?***
*Ole Wich gjørdi myndina til teigin Bloggan í Dimmalætting 8. februar 2007. Danski plantufrøðingurin F. Børgesen (1866 -1956) tók gomlu myndina um ár 1900.*

# Samskifti – hvat er tað?

Latið okkum hyggja gjøllari at, hvat hetta við fjølmiðlum merkir.

**samskifti**
**fjølsamskifti**

Samskifti og fjølsamskifti eru orð, vit mugu geva gætur. Menniskju hava altíð havt fyri neyðini at skifta orð um eitthvørt. Hugsa bara um, hvussu tað treingir á at fáa sagt við vinkonuna, hvussu góð tú ert við nýggja dreingin í flokkinum.



*- Veitst tú hvat? Eg sá Johann leygarkvøldið, hann .... Mynd: Birgir Kruse*

**Gutenberg**
**bókaprent**
**Bíbliutekstur**

Menniskju hava altíð havt fyri neyðini at samarbeiða um at dyrka lendi, byggja hús, havnir og brýr. Í Bíbliuni lesa vit um Bábeltornið. Umframt at hetta er ein kend søga um eitt bygningsverk, peikar søgan samstundis á samskifti sum eina fortreyt fyri at arbeiða og liva í einum samfelag. Hvussu gekst við Bábeltorninum og samskiftinum millum menniskju, kunnu vit lesa um í Fyrstu Mósebók kap. 11.

Ein rættilig kollvelting í samskiftismøguleikunum hjá mannaættini var, tá ið Johann Gutenberg (um 1399-1468) í 1440-árunum fann upp á at prenta bøkur. Henda uppfinningin gjørdi, at nú kundi ein tekstur prentast í fleiri eintøkum. Ikki bara tey skriftklóku, men eisini vanlig fólk kundu lesa, dugdu tey latín og høvdu ráð at keypa bøkur. Tá so teksturin, oftast Bíbliutekstur, var týddur til móðurmálið, kundu enn fleiri lesa samstundis.



*Eftir kríggið keyptu 3 prentarar í Havn hesa maskinu, ið kundi stoypa føroyskar bókstavir. Patentið er frá 1867, og maskinan var í brúki til í februar 2006. Hon sæst uttan fyri Prentmiðstøðina í Havn. Mynd: Birgir Kruse*

**Strok** **kjaktorg** **heimasíða**

Tú hevur kanska roynt at skriva eina søgu til blaðið Strok. Tú hevur sitið heima við køksborðið ella inni á kamarinum hjá tær og skrivað, koyrt í brævbjálva og sent av stað. Ein mánað seinni kunnu øll ung, sum halda Strok, lesa tína søgu samstundis.

Ert tú ótolin og vilt hava søguna út beinanvegin, so kanst tú leggja hana á eitt kjaktorg ella eina heimasíðu. Í hesum førinum eru bæði Strok, kjaktorgið og heimasíðan ein miðil ímillum teg og øll hini ungu, sum lesa søguna.



*Einki er sum Strok og skerpikjøt. Mynd: Birgir Kruse*



*Gallup Føroyar telur hvørja viku, hvussu nógv vitja føroyskar heimasíður. Úrslitið sæst í Vevmátingarlistanum.*

**Vevmátingarlisti**

**málið** **Gallup** **talaða orðið**

Vart tú sitandi heima við køksborðið og segði mammu og pápa frá tíni søgu, brúkti tú sjálvandi málið: orðini og ljóðið, sum kom út ígjøgnum munnin og nøsina. Málið sjálvt er soleiðis ein persónligur miðil, sum tú brúkar at siga frá tínum upplivingum, royndum, kenslum og vitan. Men brúkar tú bara talaða orðið, skalt tú rópa øgiliga hart, skulu øll Føroya fólk hoyra teg.

Nei, tá velur tú heldur at royna at fáa søguna í bløðini, Kringvarpið ella ein netmiðil, har Gallup sigur, at túsundtals fólk lesa, skriva og viðmerkja.

Gallup Føroyar varð sett á stovn flaggdagin 2002. Tá varð fyrsta Gallup-kanningin gjørd í Føroyum. Síðan tá eru meira enn 130 kanningar og meira enn 75.000 samrøður gjørdar. Stovnurin eitur eftir amerikumanninum George H. Gallup (1901-1984).

**fjølmiðlar** **sendari** **móttakari** **miðil**

Teir miðlar, sum nógv fólk brúka, verða nevndir fjølmiðlar. Orðið fjøl merkir nógv, fleiri, í stórum tali. Ígjøgnum fjølmiðlarnar kann tað sama sigast nógvum fólki samstundis. Miðilin er altso ímillum ein, sum sendir eini boð, eina søgu ella eina lýsing, og so tey, sum skulu taka ímóti, fáa boðini, hoyra tíðindini ella lesa søguna.



*Megafon: vilja vit verða hoyrd, so kunnu vit brúka ein rópara. Ein fyritøka, sum javnan ger meiningarkanningar, sum koma í Kringvarpið, er hin danska Megafon. Tað merkir rópari.*

**fjølmiðlar** Tá ið vit tosa um fjølmiðlar, er talan fyrst og fremst um: bløð (dagbløð, vikubløð, tíðarrit o.s.fr.), bøkur, útvarp, sjónvarp, fløgur og filmar, men eisini netmiðlar, ið kunnu vera samvirknir.




6 føroysk bløð í 1958: Dagblaðið, Dimmalætting, Føroyatíðindi, Norðlýsið, 14. September og Sosialurin.
Foto: Preben Sørensen




6 føroysk bløð í 2004: Fregnir, Oyggjatíðindi, Norðlýsið, FF-blaðið, Dimmalætting og Sosialurin.
Foto: Ingi Joensen

**Kjakevni:** Veljið eina viku, har tit øll í flokkinum gera upp, hvussu nógva tíð tit dagliga brúka til fjølmiðlar. Skiftið orð um ymsu miðlarnar og brúktu tíðina.

**Kjakevni:** Hvat mundu fólk gera, tá einki elektrisitet og eingin fjølmiðil var?

**Kjakevni:** Ger upp, hvørji sms-boð tú hevur sent hesa vikuna. Samanber við hini í flokkinum. Brúkar tú eisini teldupost? Skiftið orð um, hvat er betur sms ella teldupostur.

# Sjónvarp

**Kringvarp Føroya**

Allir miðlar hava síni eyðkenni og eginleikar. Summar kunnu vit lesa, leggja frá okkum og venda aftur til, meðan aðrir miðlar eru beinleiðis og krevja at vit brúka fleiri av okkara sansum. Umframt at vera hentir, kunnu fjølmiðlar eisini vera samansettir og truplir.

Ein teirra er sjónvarpið. Latið okkum tí taka føroyska sjónvarpið, Kringvarp Føroya, sum dømi um ein fjølmiðil og støðu hansara í Føroyum.




*Johnsigurd Johannesen lesur tíðindi í Degi og viku. Í USA verður starvið kallað anchor man. Mynd: Birgir Kruse*

*Fyri jól 2006 er Vígdis gesta-DJ hjá útvarpsstøðini The Voice í Keypmannahavn. Mynd: The Voice*



*Vígdis Hentze Olsen á pallinum. Mynd: Kringvarpið*



**kend fólk**

Tá føroyska Vígdis Hentze Olsen vann eina dansikapping í donskum sjónvarpi, bleiv hon kend frá degi til dags. Vikublaðið valdi at kalla hana dansidrotning og hevði hesa samrøðu við hana:

*Øll hava eina meining um meg. Tað hevur verið ótrúliga stuttligt, men samstundis eisini strævið. Eg haldi ikki, at tað strævnasta hevur verið at skula venja nógv og altíð at royna nýggj dansisløg. Tað hevur verið ógvuliga gevandi, og eg elski jú at dansa. At talan hevur verið um sjónvarp, hevur verið strævið. Tú setir høg krøv til sín sjálvs, og tú veitst, at fólk úr dansiheiminum sita og hyggja eftir tær og gera sær eina meining um teg. Tað kann vera ringt at vita, at øll hava eina meining um meg, greiðir Vígdis álvarsliga frá.*

*(Vikublaðið 17. desember 2006)*

# *Tíðindi elva til kjak*

**Dannebrog**

**Merkið**

Umframt at gera teg kenda, kann tað, ið ein sigur í sjónvarpi, elva til kjak. Tá løgmaður vil lata upp eina føroyska sendistovu í Reykjavík, tekur spurningurin um flaggið seg upp. Greitt er ikki, um flaggast skal við føroyska Merkinum ella donsku Dannebrog. Frammanundan er ein donsk sendistova í sama býi. Til ber ikki at hava eina afturat. Og hvat er so at gera?



*Poul Mohr, fyrrverandi íslendskur konsul og sjónvarpsmaðurin Bogi Godtfred. Foto: Sjónvarp Føroya.*

**Dagur og Vika**

Í tíðindasendingin, Dagur og Vika, velur sjónvarpið at tosa við Poul Mohr, sum er fráfarandi íslendskur konsul í Føroyum. Poul sigur sína hjartans meingin og fær nógva tíð at greiða frá almennum og persónligum sjónarmiðum.

**lesarabræv**

Hetta fellur mongum fyri bróstið. Í lesarabrævi í bløðunum sigur Rolf Guttesen soleiðis:

*Báðir aktørar, Sjónvarp og Poul Mohr, blanda tingini saman. Teir burdu vitað betur! Tí má vera mær loyvt at spyrja, um teir hava nakra fjalda dagsskrá? Hvat er meiningin? Ella er hatta bara vanlig (ella óvanlig) dummheit?*
*Poul Mohr og aðrir "tjóðskaparmenn" burdu verið fegnir um, at Føroya Landsstýri kann brúka ta ekspertisu og alt tað praktiska, sum liggur í at fáa eina skrivstovu í samband við ambassaduna hjá Ríkisfelagsskapinum (Danmark). Tí Føroyar kunnu, sambart Wienerkonventiónina (ikki skrivast Vinarkonventión, sum vissir málspillarar gjarna vilja) um diplomatiska umboðan, hvørki hava ambassadu, generalkonsulat ella konsulat í Íslandi ella aðrastaðni. Tú kanst vera nøgdur ella ónøgdur við støðuna, sum hon er - men soleiðis er veruleikin.*
*Tí misbrúkar Poul Mohr sína diplomatisku støðu sum íslendskur umboðsmaður, tá hann leggur á Danmark og háðandi hvessir, at "teir vilja hava Danabrókina hangandi uppi yvir føroysku sendistovuni". Hatta kann ein diplomatur hvørki siga ella meina!*
*Og Sjónvarpið dugir ikki síni ting, tá teir kunnu siga sovorðið svass, sum citerað er omanfyri! Og ikki eru førir fyri at seta bert ein einasta kritiskan spurning.*
*(Brot úr lesarabrævi, Sosialurin 6. mars 2007)*

**tíðindaleiðari** Tíðindaleiðarin í Sjónvarpinum, Øssur Winthereig, svarar soleiðis aftur í lesarabrævi í bløðunum:

*Sjónvarpið hevur eins og aðrir miðlar ein leiklut í fólkaræðinum.* **fólkaræði** *Ein týðandi partur er at viðlíkahalda, bjóða av, ganga undan og endurnýggja tann vígvøllin, har orðini vera sett upp móti hvørjum øðrum. Relevantir persónar, viðkomandi spurningar, viðkomandi sjónarmið, sum kunnu kunnu upplýsa, eggja til orðaskifti, bjóða av, øsa og undirhalda. Alt hetta skal sjálvandi byggja á eitt trúverdugt grundarlag. Og nógv afturat.*

**avbjóðing** **øsing** **undirhald**

*Men eftir stendur, at sjónvarpið við at hava eina samrøðu við Poul Mohr, uppfylti fleiri av teimum treytum, sum vit seta til okkum sjálvi. Vit valdu ein relevantan persón - nevniliga íslendska konsulin í meiri enn 20 ár. Hansara sjónarmið um, hvussu hann helt íslendingar sóu íkomnu støðuna, hann var óræddur í sínum atfinningum at politiska valdinum, hann hevði orðið í síni makt og var undirhaldandi. Og tað týdningarmesta.*

*Hetta eggjaði til eitt týðandi og viðkomandi kjak. Tað var endamálið í hesum føri. Í øðrum føri kann endamálið og ætlanin vera okkurt annað. Men í hesum førinum rukku vit málinum.*

*(Brot úr lesarabrævi, Dimmalætting 14. mars 2007)*



*Meðan myndafólk fylgja við, tosar tíðindaleiðarin, Øssur Winthereig, við valevni í beinleiðis politiskari valsending 2004. Foto: Sjónvarp Føroya.*

Vit kunnu staðfesta, at tíðindasendingar í loftmiðlunum munnu vera mest kjakskapandi støðini í landinum.

**kjak** Kjakið kann byrja í tíðindasendingini, flyta seg til lesarabrøv, skapa eina meining millum fólk, elva til greinar í bløðunum og síðani enda í Løgtinginum. **Føroya Løgting**

Í Føroyum kunnu allir føroyingar síggja Kringvarpið, ið er eitt alment sjónvarp. Harumframt kunnu vit síggja útlendskar sjónvarpssendistøðir sum CNN, BBC, DR, TV2, Euro Sport o.a.



*Umvegis BBC verður kjak á lærda háskúlanum í Oxford borið innar í hvørja stovu í Føroyum. Foto: Birgir Kruse*




***Gekkaloysn.*** *Eisini Gekkurin sleppur framat. Uppskotið hjá teknaran Óli P um, hvussu samgonguósemjan um skiftistíðina kann loysast. (Sosialurin 1. februar 2001)*

**Kjakevni:** Ymsir miðlar krevja ymsar sansir. Hvørjar sansir krevur sjónvarpið?

# Alment og privat

**Kringvarpsstýri**
**loyvishavari**
**kringvarpsstøð**
**public service**

Kringvarp Føroya sendir sambært lóg um alment kringvarp í Føroyum. Aðrar kringvarpsstøðir verða eisini nevndar í lógini, men bara Kringvarpið hevur loyvi at krevja gjald frá brúkarum. Hinar kringvarpsstøðirnar hava tó somu møguleikar sum Kringvarpið at fáa inntøkur frá eydnuspølum, lýsingum og sponsorum.

Eitt Kringvarpsstýri hevur ábyrgdina av tí, sum sent verður í Kringvarpinum, meðan ein loyvishavari hevur ábyrgdina av tí, sum aðrar kringvarpsstøðir senda.

Kringvarp Føroya hevur skyldu til at útvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Hugtakið public service verður nevnt sum ein serlig skylda hjá Kringvarpinum.




*Útvarpskvinnan Óluva Zachariassen lesur tíðindi í Kringvarpinum. Undir yvirskriftini "Ovbyrjaðar tíðindadeildir" í Sosialinum 2. februar 2007 sigur hon frá um arbeiðsviðurskifti á einum public service miðli. Foto: Birgir Kruse.*

**Kjakevni:** Eru allir fjølmiðlar líka fyri lógini?

**Kjakevni:** Hví skal Kringvarp Føroya sleppa at krevja, at fólk skulu gjalda, tá aðrir miðlar ikki sleppa?

# *Orð og myndir sum vápn?*

**Fjølmiðlanevnd** · **góður fjølmiðlasiður** · **fjølmiðlaábyrgd** · **Norsk Presseforbund**

Onkuntíð eru ógvuslig tíðindi um kend fólk ella politikarar í Kringvarpinum. Eru fólk ónøgd við tíðindini, so ber til at klaga. Tá tekur Fjølmiðlanevndin ímóti kæruni og metir, um góður fjølmiðlasiður hevur verið hildin ella ikki. Hugtakið góður fjølmiðlasiður er nevnt í løgtingslóg um fjølmiðlaábyrgd. Har stendur, at fjølmiðlar skulu halda góðan fjølmiðlasið.

Formaðurin í Fjølmiðlanevndini sigur í sjónvarpsamrøðu á vári 2007, at eftir sum fleiri føroyskir journalistar hava útbúgving úr Noregi, so vísa tey til norskar vegleiðingar um at halda góðan fjølmiðlasið. Síðani 1936 hevur Norsk Presseforbund orðað reglur fyri góðan fjølmiðlasið. Reglurnar eru galdandi fyri bløð, útvarp, sjónvarp og netmiðlar.


VINNU VITAN

Íslendsk kvettroynd móti Thor miseydnað

*3. mai 2007 ávarar Vinnuvitan móti landasvíkjarum.*

Í Noregi er galdandi, at bæði redaktørur og hin einstaki medarbeiðarin skulu grunda fjølmiðlavirksemi á avtalaði etisk virði. Pressuetisku virðini eru galdandi frá tí, at ein journalistur varnast eina søgu, byrjar at savna tilfar, og til endaliga søgan verður borin fram. Pressuetisku virðini eru tey somu, sum vit nevna fjølmiðlasiður.

Norska vegleiðingin um góðan fjølmiðlasið verður rópt "Ver varsom" og sæst á heimasíðuni hjá Norsk Presseforbund www.presse.no > Etikk. Vegleiðingin endar við hesum orðum:

*Orð og myndir eru veldig vápn, misnýt tey ikki!*




***Góðsking**. Teknarin Óli P. hevur hesa viðmerking, tá samgongan við lóg ætlar at hækka miðlagóðskuna. (Sosialurin 25. januar 2003)*

**Kjakevni:** Ger tað nakran mun, um ein ósonn grein, ið hevur verið prentað, seinni verður rættað?

**Kjakevni:** Orðatakið sigur: Sjáldan rýkur av ongum brandi. Hvat merkir tað?

# *Tíðindastovur*

**journalistar** **Reuters** **Ritzau** **NTB**

Á tíðindastovum arbeiða journalistar, ið savna og skriva tíðindi til tíðindaveitarar so sum bløð, útvarp og sjónvarp. Kendasta tíðindastovan er Reuters, sum inntil 2005 var í Fleet Street. Henda gøtan hevur tikið navn eftir ánni Fleet í London. Gøtan er kend, tí her helt bretska pressan til. Hóast øll bløðini eru flutt úr Fleet Street fyri meiri enn 20 árum síðani, verður gøtunavnið enn brúkt, tá sipað verður til bretsku pressuna. “Fleet Street sigur...” kann verða sagt, tá meint verður við bretsku pressuna yvirhøvur.

Tíðindastovan Reuters, ið var stovnað í 1851, heldur nú til í nútímans hølum á Canary Wharf í London og hevur deildir aðrastaðni kring heimin. Reuters og danska tíðindastovan Ritzau, ið varð stovnað í 1866, eru kendastu tíðindastovur á okkara leiðum. NTB (Norsk Telegrambyrå), ið varð stovnað í 1867, er størsta tíðindastovan í Noregi. Vit hava ikki egna tíðindastovu í Føroyum. Bankar og stórar fyritøkur hava ofta egnar tíðindastovur ella samskiftisdeildir, ið hava til endamáls at fáa góða umrøðu í fjølmiðlunum.




*Írski journalisturin og politikarin T.P.O'Connor (1848-1929) í Fleet Street í London: “His pen could lay bare the bones of a book or the soul of a statesman in a few vivid lines.” Mynd: Birgir Kruse.*




*Nú er alt bara minnir. Í dag eru øll bløð flutt úr Fleet Street í London. Mynd: Birgir Kruse.*

**Kjakevni:** Høvdu Føroyar verið kendar, um vit høvdu eina tíðindastovu?

**Kjakevni:** Hvør er munurin á tíðindum frá eini tíðindastovu og tíðindunum, sum er gjørd á einum blaði, ella eini fyritøku?

# *Á føroyskum – ella donskum?*

**Útvarp Føroya**

Útvarp Føroya var føroyskt frá fyrsta degi í 1957. Ein maður og ein kvinna lósu tíðindini og veðrið á middegi hin 6. februar 1957:

Axel Tórgarð lesur: *Útvarp Føroya, góðan dag. Í dag mikudagin 6. februar 1957 verður farið undir regluligt føroyskt útvarp. Løgtingslógin um útvarp kom í gildi 28. mars 1956 og samsvarandi henni er tað Føroya Løgting, sum hevur sett á stovn og røkir hesa útvarpsstøð, sum tit nú hoyra. Støðin verður nevnd Útvarp Føroya. Sendarin er upp á 5 kilowatt, og sent verður á 1367 kilohertz, tað er 210 metrar. Skráin verður vanliga tann, at gerandisdagar verður sent tvær reisur. Á middegi klokkan 12:20 til klokkan 12:50, og tá verða send veðurtíðindi, tíðindi úr Føroyum og úr útheiminum, kunngeringar og so tónleikur. Um kvøldið gerandisdagar verður sent klokkan 18:30 til 19:15, og tað verða eisini veðurtíðindi og tíðindi, men harumframt verður sent serstøk skrá við fyrilestrum, tónleiki, sangi og tílíkum. Sunnudagar fer vanliga at verða sent klokkan 16:00 til 17:00, og tað verða helst sendar gudstænastur ymsastaðni í Føroyum.*

Hjørdis Thomsen lesur: *Fyribils logn og eitt sindur lýggjari veður. Í morgin lot av suðri ella landsynningi suðri og sum frálíður regn.*

Tíðindini henda fyrsta dagin hjá Útvarpi Føroya vóru um ferðamannaskipini Gullfoss og Dronning Alexandrine (Drottningin), sum bæði komu á Havnina eftir ferðafólki. Síðani eru tíðindi um Fiskimannafelagið, ein sandbát í Fuglafirði og føroyskar útróðrarmenn í Grønlandi. Útlendsku tíðindini eru um Danmark og NATO, Miðeystur og Suez-veitina og úr Afrika.




*Tá Útvarpið fylti 50 ár, vísti formaðurin í Málstevnunevndini á álvarsliga málsligar trupulleikar í sendingunum. Atfinningarsama greinin, sum stóð í Dimmalætting 9. februar 2007, var myndprýdd av Ole Wich.*

So løgdu tey bæði í útvarpsstovuni eina plátu á við kenda svarta sangaranum Paul Robeson, sum varð meint raktur av McCarthy-jakstranini í USA í fimmtiárunum. Tað var senatorurin Joseph R. McCarthy, ið hevði sett sær fyri at taka alt vald frá kommunistum í USA. Ivasamt var, hvør var kommunistur, men tey, ið komu á hansara lista, mistu alla tign og fingu einki arbeiði.

**McCarthy**




*Í filminum "Good night, and Good Luck" (George Clooney 2005) fylgja vit journalistinum Edward R. Murrow (1908-1965), sum í sjónvarpssendingini "See it now" viðger senatorin Joseph R. McCarthy (1908-1957). Sendingin fellir hin eirindaleysa senatorin og McCarthy-jakstranin steðgar. Mynd: Úr filminum.*

Fyrsta føroyska útvarpskvøldið endaði við at landstýrismaðurin, Edvard Mitens, (1889-1973) helt fyrilestur um nýggja miðilin og sang ein sang, sum hann sjálvur hevði yrkt til høvið.

Burtursæð frá sendingunum Top of the Pops hjá Brian Matthews, sum Útvarpið keypti frá BBC seinast í 1970'unum og morgunsendingarnar hjá Michael Reveal í 1990'unum, hevur Útvarpið í 50 ár sent á føroyskum og ger tað í høvuðsheitum enn. Einasta undantakið er Soul Nation, ið Anna Yachino ger.

**á føroyskum**

Lurtarin kravdi føroyskt mál í øllum sendingum. Serliga mótvegis donskum hevur tolsemið hjá lurtarunum verið avmarkað. Einaferðina varð ein monologur hjá Ebbe Rode, ið vardi 6 minuttir, lagdur á plátuspælaran. Lurtarar ringdu beinanvegin inn til Útvarpið og kravdu at steðga hasi donsku "sendingini".




*Steðga hasi donsku sendingini!
Mynd: Plátuhúsi.*




***Hornaspark.*** *Teknarin Óli P. staðfestir, at "Sjónvarp Føroya Fólks hevur avgjørt at gerast ein deild av Danmarks Radio" (Sosialurin 29. juni 2004)*

**á donskum**

**Dagur og Vika**

**málið**

**Kringvarp Føroya**

Í 1979 varð farið at senda sjónvarp í Føroyum. Sjónvarpsfeløg endursendu donsk videobond og danskar TV-avísir. Í 1984 verður Sjónvarp Føroya sett á stovn, og tíðindasendingin Dagur og Vika kemur á føroyskum. Tá vóru nógv, ið mótmæltu í lesarabrøvum og heldur vildu hava donsku TV-avísina. Sum frá leið, komu fleiri føroyskar sendingar.
1. januar 2005 verða Útvarpið og Sjónvarpið løgd saman og kallast Kringvarp Føroya.
Føroyskar sendingar hava verið týdningarmiklar fyri almennu miðlarnar. Meðan Útvarpið hevur lokið treytina um føroyskar sendingar, hevur hetta verið ein afturvendandi trupulleiki hjá Sjónvarpinum. Sagt hevur verið, at so nógvar sjónvarpssendingar sum gjørligt skuldu vera føroyskar. Við ársbyrjan 2001 varð ásett í lóg, at 1/3 av sjónvarpssendingum skuldu verða føroyskar. Samstundis varð bannað hinum kringvarpsstøðunum at senda útlendskar sendingar. Hesar ásetingar eru nú sleptar.

Men eftir stendur spurningurin, hvat er ein føroysk sending, og hvat er føroyskt tilfar. Í útvarpi er málið avgerandi fyri, um ein sending er føroysk. Eitt nú verða tónleikasendingar við føroyskari talu millum løgini roknaðar, sum føroyskar sendingar. Í sjónvarpi eru sendingar, ið eru gjørdar í Føroyum, føroyskar, meðan filmar við donskum undirtekstum ikki eru føroyskir. Í flestu londum er krav til almennar sjónvarpsrásir, at útlendskir filmar skulu hava undirtekst á móðurmálinum. Hetta kravið er ikki í Føroyum. Ein avleiðing er, at børn finna uppá at spæla á donskum.

**Kjakevni:** Hvønn týdning hevur móðurmálið í einum fjølmiðli?

**Kjakevni:** Hví tola vit danskt í sjónvarpinum, tá vit ikki tola tað í útvarpinum?

**Kjakevni:** Hvat er tað, ið ger sendingar í útvarpi og sjónvarpi føroyskar?
Hvør er størsti munur á føroyskum og útlendskum sendingum?

# *Inntøkur*

**Kringvarpsgjald**

**gávur**

**lýsingar**

Kringvarpsgjaldið, sum er ásett við lóg, er høvuðsinntøkan hjá Kringvarpinum. Men Kringvarpið fær eisini inntøkur við at senda lýsingar fyri privatar handilsfyritøkur, kunngerðir fyri áhugafeløg, kvøðuljómar og eydnuspæl.

**Rás 2**

**Lindin**

Hinar kringvarpsstøðirnar, t.e. Rás 2 og Lindin, hava munin meiri skerd inntøkuviðurskifti. Lindin vil ikki byggja raksturin á inntøkur fyri lýsingar. Tað eru bara samkomur og líknandi, ið lýsa um møti og tiltøk. Allar inntøkur hjá Lindini eru gávur, sum vanlig fólk og nakrar fyritøkur lata. Rás 2 hevur bara lýsingamarknaðin at dúva uppá. Hvat inntøkum viðvíkir, er Rás 2 sostatt í somu støðu sum bløðini og øll tey tiltøk, sum hvørt summar eru innan ítrótt og tónleik, og eisini vilja hava somu fyritøkur at lýsa hjá teimum. Kappingin um lýsingapengar er sostatt rættuliga hørð.




*Rás 2 er elsta sendistøð uttan fyri Útvarpið. Eyðfinn Drewsen sendir úr Havn. Egin upptøkuhøli eru eisini í Søldarfirði. Mynd: Birgir Kruse*

**lýsingaprísir**

Lýsingarnar kosta ymist, alt eftir hvussu stórar ella ágangandi tær eru. Kappingin er hørð um tær krónurnar, sum eru á føroyska lýsingarmarknaðinum.

Í summum bløðum ber til at síggja eina handilsliga lýsing og eina blaðgrein um sama evnið við síðuna av. Tað merkir, at blaðið vil umrøða ein lut, ið er til sølu, um fyritøkan vil lýsa afturfyri. At knýta greinar í bløðum saman við handilslýsingum verður ikki hildið at lúka krøvini um góðan fjølmiðlasið.



*Lindin var fyrsti miðil at senda dag og nátt. Maiken Háberg Hansen og Tór Arni Samuelsen senda úr Bøkjarabrekku í Havn. Mynd: Birgir Kruse*

**sjónvarpslýsingar**

**rating**

**hyggjarakanningar**

Sjónvarp hevur víst seg at vera ein sera væl hóskandi miðil at senda lýsingar í. Tí sært tú ofta lýsingar í sambandi við serliga áhugaverdar sendingar, ið hava nógvar hyggjarar, sum t.d. Dagur og Vika og ítróttarsendingar. Tey, ið lýsa, eru fús at gjalda fitt av pengum fyri at fáa sína lýsing senda, júst áðrenn ein tílík sending kemur, ella beint eftir at hon hevur verið.

Kanningar verða eisini gjørdar um, nær fólk hyggja í sjónvarp, og hvørjum sendingum teimum dámar best at hyggja at. Hetta eru sokallaðar "rating"-kanningar. Í Føroyum er tað Gallup, ið ger hyggjarakanningar.

Hetta er hent hjá sjónvarpstøðum at hava at vísa til, tá ið tær skulu hava fyritøkur at lýsa í júst sínum miðili og ikki hjá øðrum.

**Kjakevni:** Í hvørjum føroyskum fjølmiðli hevði tú vilja verið kassameistari?

**Kjakevni:** Hvør kappast um lýsingapengarnar í Føroyum?

# Fjórða samfelagsmaktin

§266b

fjórða samfelagsmaktin

Tað er týdningarmikið at gera sær vandnar metingar av fjølmiðlunum. Fjølmiðlarnir fara við nógv av okkara tíð og seta dám á okkara gerandisdag. Fjølmiðlarnir hava vald, og sagt verður, at teir eru fjórða samfelagsmaktin. Hetta merkir, at fjølmiðlarnir ofta eru við til at gera av, hvat verður havt á munni manna millum. Eisini er tað so, at politikarar og onnur, ið skulu taka avgerðir, verða noydd at taka mál og evni upp og gera okkurt við tey, júst tí at tey hava verið frammi í fjølmiðlunum.

Dømi um hetta er nógva umrøðan, sum broytingin av grein 266b í revsilógini elvdi til í 2006. Tað var málið um at skoyta "kynsligan samleika" upp í revsilógina við síðuna av húðaliti, kyni og átrúnaði, ið eru munir á fólki, men sum ikki mugu føra til mismun. Umrøðan fylti so nógv í miðlunum, at politikarar vórðu noyddir at taka eina støðu í málinum. Støðutakanin hevði við sær, at ein politikari meldaði seg úr einum flokki og inn í ein annan. Ein annar politikari umhugsaði at gera tað sama.



*Karsten Hansen, sum leingi var limur og næstformaður í Tjóðveldisflokkinum, segði seg úr flokkinum, tá kjakið um §266b var av. Beint eftir at Karsten hevur hildið røðu hin 15. desember 2006, stendur hann og tosar við Bill Justinussen úr Miðflokkinum (tv). Seinni gjørdist Karsten limur í Miðflokkinum. Mynd: Ole Wich.*

**Kjakevni:** Hvørjar eru hinar samfelagsmaktirnar?

# *Handilsvøra*

**handilsvøra**

**tíðindaskriv**

Fjølmiðlar eru eisini ein handilsvøra, og nógvir pengar eru uppií. Lýsingafyritøkur hava seravtalur um ávísar síður í bløðunum, og onkrar lýsingafyritøkur fáa sær egin bløð og knýta kjaksíður aftur at bløðunum. Telefyritøkur, sum eisini veita nettænastur, gerast partaeigarar í bløðum, sum skriva tíðindi. Alt hetta bendir á, at fjølmiðlar eru ein handil, sum skal loysa seg og geva størri og størri avkast.

Tá kann verða trupult hjá brúkaranum at skilja millum tíðindi, lýsingar og so frásagnir, sum kunnu vera eitt bland av øllum.

Til dømis kann eitt blað skriva um G! Festivalin, meðan eitt annað blað skrivar um Summarfestivalin. Ein grein hevur frámerkið tíðindaskriv, men samstundis er ein kendur persónur úr tónleikalívinum, sum gevur viðmæli, so áhugað kenna seg noydd at lurta eftir einum ávísum navni. Tilfarið líkist redaktionellari tíðindagrein og kvalifiseraðum kjaki, men er samstundis kallað tíðindaskriv.




*Á vári 2007 er fleiri opnur um G! Festivalin í Dimmalætting. Henda er frá 16. mars 2007. Til høgru er innsettur tekstur við mynd, ið ber brá av journalistiskari viðgerð. Hvør er persónurin? Fær lesarin at vita, um hetta er tíðindaskriv ella handilslig lýsing? Mynd: Birgir Kruse*

**brúkarabólkur**

**tíðindastova**

Eitt tíðarskeið kunnu vit síggja, at eitt blað ger nógv burtur úr at lýsa ein festival. Næstu viku kann úrvalið skifta. Gentan, sum ætlar sær til festivalin, kann vera nøgd. Men samstundis kann hon seta sær spurningin: kunnu tíðindi uppfinnast? Kunnu tíðindi gerast um eitt ávíst evni, tí tað tænir einum ávísum endamáli? Gera tíðindafólk sær ørindi, ella eru hetta veruliga tíðindi, sum ein tíðindastova hevur sent út?

Altjóða kanningar benda á, at ungdómur er ein stórur og sterkur brúkarabólkur. Tey ganga til konsertir, spæla telduspøl, hyggja eftir filmi og lurta eftir tónleiki. Elsti miðil her á landi eru prentaðu bløðini. Skilligt er, at bløðini eisini vilja hava part av marknaðinum. Í innihaldi vilja tey tí tekkjast teim ungu.

**upplagstølini** Hægstu upplagstølini hjá bløðunum hava higartil verið fríggjadagar. Tá eru bløðini størst og fólk hava betri stundir enn aðrar dagar at lesa. Men síðani Vikublaðið kom á marknaðin og verður borið ókeypis í hvørt hús, hevur Dimmalætting tikið kappingina upp. Týskvøld verður størsta upplagið prentað og Dimmalætting verður eins og Vikublaðið borin ókeypis í hvørt hús í landinum.

Mánakvøld plaga upplagstølini hjá bløðunum eisini at vera høg. Tá verða ítróttaúrslitini frá vikuskiftinum viðgjørd. Útvarpið kappast um henda málbólk og endursendir ítróttafrásagnir frá vikuskiftinum mánamorgun áðrenn vit fara í skúla. 3-2, sum er einasta sjónvarpssending við ítrótti, verður eisini send mánakvøld.

Lægstu upplagstølini hjá bløðunum eru mikudagar. Royndir sum Krydd, ið var eitt ungdómsblað hjá Dimmalætting, varð prentað henda dagin. Tá formaðurin í Fiskimannafelagnum fór frá við ársbyrjan 2007 og FF-blaðið fór í søguna, beyð Sosialurin honum at skriva siðsøguligar greinar í blaðið mikudagar. Orsøkin er helst, at henda dag er minsti vágin, samstundis sum bestu møguleikar eru fyri vinnuligum vøkstri og at lofta lesarunum hjá farna FF-blaðnum.



*Ítróttur fyllur nogv í miðlunum. Her er føroyameistarin í hondbólti 2007 funnin og sjónvarpsmaðurin Tórður Mikkelsen tosar við Joan M. Djordjevic úr Stjørnuni. Mynd: Sjónvarp Føroya.*




***Dimminimum.*** *Tá Dimmalætting í 2005 kom í nýggjari støðd, varð kapping tikin upp við Vikublaðið, sum er ókeypis. Tá hevði Óli P., ið er teknari á Sosialinum, hesa viðmerking: "Dimmalætting, ið er nógv minkað í vavi, kemur nú eisini fyri onki – av og á." (Sosialurin 9. apríl 2005)*

**ferðafrásagnir** **brúkarar**

Tá summarfrítíðin nærkast kunnu vit lesa ferðafrásagnir í bløðunum. Tað kunnu vera tónleika- ella ítróttaferðir við Norrønu og Atlantsflogi, sum fyritøkur ella einstaklingar skipa fyri. Vanligt er eisini, at upp undir høgtíðir sum páskir, kunnu vit lesa ferðafrásagnir til Heilaga landið. Navnið á journalistinum verður upplýst, men vit fáa ikki at vita, hvussu ferðin er fingin í lag, og hvør hevur rindað. Siga vit, at vit eru brúkarar, eiga vit greitt at fáa tílík viðurskifti at vita.

**Kjakevni:** Hevur tað týdning fyri teg, at tú veitst, um ein tekstur í einum blaði er reklama, tíðindaskriv ella ein professionell blaðgrein? Er tað líka lætt at varnast hesi viðurskifti í útvarpi og sjónvarpi?

**Kjakevni:** Hvussu umrøður Sosialurin Summarfestivalin?

**Kjakevni:** Hvussu umrøður Dimmalætting G! festivalin?

**Kjakevni:** Hvønn týdning hevur eitt høgt upplagstal?

# Samanrenning

**sjónvarp** **telda**

Stórar broytingar hava verið innan fjølmiðlaøkið, og broytingar verða eisini í framtíðini.

Nógv bendir á, at í fyrstu atløgu verður ein samanrenning millum telduna og sjónvarpið. Heima hava vit eina farteldu, sum er knýtt at sjónvarpinum, ið er eitt stórt og flatt víðvarp. Í telduni eru filmar og tónleikur, ið vit hava keypt á netinum.



*Nútímans føroysk stova, har farteldan og sjónvarpið eru bundin saman.
Mynd: Birgir Kruse/Apple*



*Martin og teir, sum koyra á motorsúkklu, senda sms-boð millum sín.
Mynd: Birgir Kruse*

**fartelefon** **undirhald** **tíðindi** **saklig upplýsing**

Greitt er eisini, at fartelefonin, sum vit øll ganga við, fer at broytast. Umframt at tosa og senda sms, fara vit eisini at avgreiða bankaflytingar, taka niður film og spæla tónleik í fartelefonini. Ferðast vit uttanlands, fer fartelefonin eisini at vísa okkum veg, læra okkum mál og bera okkum tíðindi. Fartelefonin er eisini vorðin ein eykatrygd hjá foreldrum, sum vilja vita, hvar børnini eru, og um tey vilja verða heintað eftir dansin ella eina konsert langt burturi.

Tá verður tað ein álvarsligur spurningur, hvussu man fara at verða við býtinum ímillum undirhald, tíðindi og sakliga upplýsing í fjølmiðlunum. Tí tá bera vit miðilin uppi á okkum og avgera sjálv, hvat vit vilja hava at vita. Allar tænastur fara at kosta, so førleikin at gjalda fer eisini at hava týdning.

**Kjakevni:** Hevur tú eina fartelefon? Hvussu man fartelefonin síggja út næsta ár?

# *Fjølmiðlar ávirka okkum*

**ávirkan**
**skaðilig**
**filmar**
**samvirkin telduspøl**
**spæl og veruleiki**

Dagliga kunnu vit øll seta okkum mangar spurningar um fjølmiððar og teirra ávirkan. Vit kunnu spyrja, um fjølmiðlarnir ávirka okkum sum einstaklingar, ella um teir ávirka samfelagið, sum vit eru partur av? Og munnu fjølmiðlar vera skaðiligir fyri børn og ung? Elva fjølmiðlar til meiri harðskap í samfelagnum? Er munur á at hyggja at filmi og spæla samvirkin telduspøl sum World of Warcraft? Duga vit at skyna á spæli og veruleika?



*Gentur, ið lurta eftir tungmálmsbólkinum Ineptus í Havn. Mynd: Birgir Kruse*




*Hetta er útsýnið hjá mongum føroyskum drongi. Hann spælir World of Warcraft og lurtar eftir føroyska trashmálmsbólkinum SIC. Mynd: Birgir Kruse*

**filmur**
**telduspæl**
**heavy rokk**
**skyld**

Hetta eru spurningar, sum ofta verða tiknir fram í miðlunum. Tá ið ein ógvuslig hending er farin fram, t.d. skotbardagar á einum útlendskum skúla, leita fólk eftir eini frágreiðing.

Hendingin er jú burtur úr vón og viti, skilaleys og gevur onga meining. Miðlarnir síggja, at júst hetta er ein góð søga, sum man fara at selja, jú ógvusligari og blóðigari hon er. Tí verður smurt tjúkt uppá, gingið verður nær, og eingin aftrar seg við at peika á eina einsamalla orsøk til hendingina.

Oftast er tað ein filmur, eitt telduspæl, ella eitt heavy rokk orkestur, sum fær skyldina. Tá ið friður valdar aftur, kemur oftast fram, at tann ið framdi óbótagerðina aldri hevði sæð filmin, spælt spælið, ella lurtað eftir heavy rokki.

Svarini eru ikki so eintýdd og endalig, sum vit oftani hoyra.



*Føroyar vóru millum seinastu lond at fáa sjónvarp. Her savnast ung framman fyri einum sjónvarpi í SMS í oktober 1978. Stutt eftir fór Sjónvarpfelagið í Havn at senda. Hin 1. apríl 1984 byrjaði almenna Sjónvarp Føroya at senda. Mynd: Ole Wich.*



*Í 1983 sita tveir dreingir úti í Koltri og hyggja at eini sjónvarpssending á videobandi. Mynd: Ole Wich.*




*Danski sosiologurin Jette Forchhammer hevur viðgjørt føroysk børn, og hvussu tey verða ávirkað av sjónvarpi m.a. í "Børn før TV" (1983).*

**Kjakevni:** Er størri parturin av samskifti ávirkan, heldur enn at bera boð?

**Kjakevni:** Spælir tú telduspøl? Dugir tú at skilja millum harðskap í spæli og veruleika? Duga øll tað?

# *Dreingir skjóta í Føroyum*

Týsdagin hin 30. mai 2000 sigur Sosialurin frá eini hending í Føroyum, har fýra 13-14 ára gamlir dreingir fóru at skjóta eftir fólki og bilum úr einum húsum. Málið verður viðgjørt í fleiri bløðum.



tíðindablaðið
sosialurin

Nr. 102 Týsdagur 30. mai 2000 | 74. árgangur | www.sosialurin.fo | Kr. 10,00

**Hanus leyp undan kúluni**

Skotdrama í Klaksvík: Tá Hanus Lassen fór í køksvindeygað fyri at vita, hvat var áfatt uttanfyri, vendi ein av dreingjunum rifluni ímóti honum og skjeyt

**Síða 4,5 & 6**

Hanus Lassen við blóðdálkaðari skjúrtu framman fyri køksvindeygað. Tvey skot vórðu latin av eftir Hanusi sum hann stóð framman fyri vindeygað. Men lukku tíð kláraði hann at leypa undan

*Forsíðan á Sosialinum 30. mai 2000.*
*- Var tað filmur ella telduspøl, ið fekk teir at skjóta við byrsu úr køksvindeyganum?*

Sosialurin skrivar, at "síðani hendingin fór fram sunnukvøldið, hevur verið ført fram, at ein av orsøkunum til hendingina kundi vera tann, at dreingirnir helst høvdu verið undir ringari ávirkan av telduspølum, og tí tóku til tey stig, teir gjørdu."

**veruleiki og spæl**

Sýslumaðurin sigur, at undir avhoyringunum kom einki fram, ið kundi geva eina ábending um, hví dreingirnir byrjaðu at skjóta til máls og harvið komu fleiri fólkum í vanda.

Blaðmaðurin spyr, um telduspøl á eini nýupplatnari teldukafé í býnum ikki eru orsøkin. Tann, ið hevur teldukaféina sigur, at har hava dreingirnir aldri verið.

Uppaftur verður sýslumaðurin spurdur, um ikki telduspøl eru atvoldin. Frásøgnin endar við hesum orðum: "Fæst tú nógv við sovorðið, so kann vera ringt at skilja millum veruleika og spæl, sigur sýslumaðurin at enda, sum kortini ikki kann vísa á nøkur prógv fyri, at tað var nakað av hesum, sum gjørdi seg galdandi sunnukvøldið."

Hóast hesa niðurstøðu, verður kjarnin í søguni, at telduspøl vóru atvoldin til, at fýra dreingir fóru at skjóta frá hond. Spurningurin verður tí, um tað eru dreingirnir, ið skutu, ella blaðmaðurin, ið skrivar, ið eru undir størstu ávirkanini.

**Kjakevni:** Eru telduspøl ein syndabukkur?

**Kjakevni:** Hvat er ein góð søga? Eru summar søgur betri enn aðrar?

# *Vit verða eins og hini*

**hugsanir**
**hugburðir**
**gerðir**

Latið okkum hyggja eitt sindur nærri at hesum spurningum. Um árin frá fjølmiðlunum broyta tínar hugsanir, hugburðir og gerðir, kunnu vit siga, at tú verður ávirkaður sum einstaklingur. Dømi kann vera, at tú keypir eina vøru, tí tú hevur sæð eina lýsing um hana.

Annað dømið kann vera, at ein týskari heldur uppat at keypa føroyskar fiskavørur, tí hann hevur sæð eina sending á einari sjónvarpsrás um grindadráp. Hann fær ta fatan, at føroyingar eru "barbarar", og vil tí einki hava við føroyskar fiskavørur at gera.




*Teknirøðir kunnu taka broddin av fastlæstum hugsjónum. Tá Simpsons fyltu 20, nýtti teknarin Ole Wich høvið at lata tey í føroyskan búnað. (Dimmalætting 8. mai 2007)*

Fjølmiðlar kunnu gera sær dælt av ræðandi viðurskiftum, sum eru langt burturi. Hetta kann styrkja um ræðsluna fyri øllum fremmandum og kensluna av, at hjá okkum er best, tí her hendir ikki sovorðið. Hendir tað allíkavæl, er at finna eina orsøk beinanvegin.
Tá kann henda, at nýggjastu fyribrigdini í miðlum sum filmi, telduspølum og tónleiki fáa ágang. T.d. kann Harry Potter verða skýrdur okkultur og heiðin, eins og sangarin Ozzy Osbourne. Men er tað nú so?



*Bøkurnar um Harry Potter eru týddar til føroyskt. Formaðurin í Rithøvundafelagnum Arnbjørn Ó. Dalsgarð kagar í eina. Mynd: Birgir Kruse*

**ungdómsmentan**
**fyrimyndir**
**virði**
**normar**

Ein granskari setti sær fyri at kanna, hvat hendi við ungdómsmentanini í Finnmørkini norðast í Noregi, tá ið tey har norðuri fingu sjónvarp. Hon gjørdist var við, at fyrimyndir, virði og normar hjá ungdóminum broyttust so við og við soleiðis, at ungdómurin fekk hugsanarhátt, ynski og mál, ið líktust teimum, sum ung í størru býunum høvdu. Tey ungu á bygd høvdu ikki so stóran áhuga longur fyri teim størvum og tí arbeiði, sum tey høvdu verið von við. Heldur ynsktu tey starv og útbúgving inni í býunum. Hetta fór at geva teimum størri møguleikar í lívinum, hildu tey nú.












*Teitur leitar til røturnar, men sansar eisini samtíðina á fløguni Káta Hornið (Tutl 2007). Í sanginum "Yngra Ættarliðið" sigur hann um tey ungu í Føroyum: "Tey eta ikki seyðarhøvd / í gomlum bóndastovum / tey eru sum í øðrum londum". Ovast er Elvis í 1956 og síðani Clash í 1979. Mynd: Plátuhúsar.*



***Second to none*** *er yvirskriftin hjá teknaranum Óla P., tá hann avmyndar ein gittarspælara: "Tey ungu velja sær alt annað sum livibreyð enn fiskivinnu, ið tey tó ikki kunnu vera fyriuttan". (Sosialurin 3. november 2006)*

**oddagrein**

Tá Prix Føroyar-kappingin varð hildin í 2003, gav Sosialurin út eitt Prix-blað. Í oddagrein varð skrivað, at fleiri ung enn nakrantíð vildu útbúgva seg innan mentan, t.e. tónleik, sjónleik og dans. Eisini vóru fleiri ung, ið vildu læra til kokk og koma í sjónvarp. Fiskivinnan var hin minst áhugaverda at velja sum lívsstarv.

**Kjakevni:** Hvat merkir hugtakið the global village?

**Kjakevni:** Hvørji føroysk fyribrigdi finna vit í tekningini av Simpson og teimum?

# *Íbundin ella avkrøkt?*

**ungdóm**

Eins og staðfest varð millum ungdóm í Finnmørkini, kunnu vit siga, at fyrimyndir, virði og normar hjá føroyskum ungdómi broytast. Um vit búgva á bygd ella í bý, so eru vit partar av tí ráki, sum fjølmiðlar skapa og bera inn í okkara stovu. Vit síggja Teit, Eivør og Týr, men eisini Jamie Oliver og aðrar sjónvarpskokkar. Tá vit velja útbúgving og lívsleið, hava vit hesi í huga.



*Gentur á stórbýarkafé við egnari teldu – og einum glasi av vatni. Mynd: Birgir Kruse*

**on-line samfelag**

Føroyskur ungdómur er ein bólkur, sum í alt minni mun er eftirbátur. Tvørturímóti er ungdómur í dag eyðkendur fyri at liva í einum on-line samfelagi, sum altíð er í gongd og altíð slóðar fyri nýggjum ráki og møguleikum at arbeiða og gera vart við seg. Vit keypa tónleik, film og bókmentir á netinum. Hvørki føroyskir handlar ella tollmyndugleikar kunnu forða hesi gongd. Ungdómurin hevur bæði tøknina, tørvin og pengarnar. Hetta ger ungdómin til ein sera áhugaverdan málbólk hjá undirhalds- og fjølmiðlavinnuni.

**málbólkur**

**børn**

Hyggja vit at børnum, síggja vit, at tey finna upp á at spæla leiklutir, tey kenna úr sjónvarpi og telduspølum. T.d. kunnu børn á føstulávint lata seg í sum Disney prinsessur, Bratz, Zorro, Batman og Spiderman. Hetta er eisini dømi um ávirkan. Ávirkanin er ikki bara her heima, men rakar mest sum allan heimin samstundis. Hetta ger børnini til ein enn meiri ahugaverdan málbólk hjá undirhalds- og fjølmiðlavinnuni. Samstundis mugu vit ásanna, at fjølbroytnið hvørvur, og at prísurin fyri at gerast heimsborgarar er ein einsháttaður uppvøkstur í øllum londum. Ávirkanin á børn sæst eisini aftur í málinum. Fleiri foreldur hoyra, at børnini kunnu finna uppá at spæla á donskum.

Umframt at børn og ung eru vorðin heimsborgarar, eru tey samstundis besti fongur hjá vinnuni, sum vil hava okkum at keypa upplivingar, lutir og útgerð.



*Nett sama dag sum í øðrum londum sýnir Ruth Djurhuus Jakobsen PlayStation 3 í Expert. Mynd: Birgir Kruse*

**heimasíður** Heimasíður eru fastur partur av marknaðarføring. Heimasíðurnar verða brúktar til at skapa forvitni, tá okkurt nýtt kemur á marknaðin. Síðurnar **kjaktorg** kunnu víðkast til at verða kjaktorg við sama navni sum vøran ella tænastan, ið verður seld. Vøran kann eisini vera eitt blað ella tíðarrit, ein nýggj bankatænasta ella ein festivaluppliving, sum í øllum førum venda sær til ungdómin burturav.

Á kjaktorgunum læra vit at samskifta á **dulnevnd** ein nýggjan hátt. Vit kunnu vera dul**rætta navn** nevnd ella brúka okkara rætta navn. Kjakstaðurin www.kjak.fo er ikki heftur at nakrari vøru ella tænastu. Vit siga, **óheftur** at hann er óheftur. Her verða nógvar hugsanir bornar fram og endavendar. Hvørt evnið hevur sína yvirskrift.

Ein annar kjakstaður er www.kvinna.fo, sum er knýttur at einum tíðarriti **Gallup Føroyar** við sama navni. Her kunnu vit lesa inniligt orðaskifti t.d. um sorg undir yvirskriftini “Kom víðari!” Tvær dulnevndar kvinnur skriva saman um at missa ein ungan son. Møguliga er annar sonurin deyður í ferðsluvanlukku, **blogg** meðan okkurt bendir á, at hin sonurin er deyður fyri egnari hond. Báðar mammurnar skriva til hvørja aðra og viðgera sorgina hjá teimum, ið eftir sita. Nøvnini eru “mostur” og “ASG”.




Stovnurin Gallup Føroyar kunnger hvørja viku, hvussu nógv vitja føroyskar kjakstaðir og aðrar føroyskar netsíður.

Dimmalætting hevur eina kvinnuliga greinarøð, ið rópast Bloggan. Navnið er tikið eftir tí útlendska blogg, sum er ein samvirkin heimasíða, har egnar meingar verða lagdar út til alment kjak. Øll hava høvi at viðmerkja, og tað kann henda, at viðmerkingarnar verða betri enn upprunaligi teksturin, ella at okkurt heilt nýtt og óvæntað hendi.




*Teigurin Bloggan er í Dimmalætting hvønn hósdag.*

**tykisheimur** **World of Warcraft**

Eins og vit kunnu blogga og kjakast on-line við hópin av fólkum um eitt ávíst evni á okkara máli, so kunnu vit eisini velja at spæla í tykisheimi. Velja vit spælið World of Warcraft, so ber til at spæla beinleiðis við fólk úr øllum heiminum.

Vit kunnu samskifta á enskum við tey og læra tey at kenna. Saman við teimum kunnu vit menna spælið, gera nýggjar persónar og amboð og finna upp á nýggja strategi í spælinum. Vandi er tó í hvørjari vælferð. Vit eiga altíð at vera varin, áðrenn vit lata persónligar upplýsingar frá okkum.







*Millum gjørdu persónarnar í spælinum World of Warcraft eru fleiri føroyskir fremstir, tí teir hava hægsta stigatal. Teir eita nøvn sum Ketil, Palleba og Sjálvmundur. Myndir: Birgir Kruse*




*Reuters hevur keypt seg inn í Second Life. Mynd: Reuters*



*Ein avatar í Second Life. Mynd: Wikipedia*




*Adam Reuters er redaktørur í Second Life. Í veruliga lívinum er hann Adam Pasick og skrivar um miðlar og tøkni. Mynd: Reuters*

**Second Life** **internetið** **avatar** **virtuelt umhvørvi**

Second Life er ein tykisheimur, sum bara slepst til um telduna og internetið. Umhvørvið og persónarnir eru gjørdir. Persónarnir verða nevndir avatar. Second Life er eitt virtuelt umhvørvi, har vit kunnu ferðast og reika og ikki eitt spæl, har vit kunnu vinna ella tapa. Rithøvundurin Julian Dibble hevur prentað eina skaldsøgu í Second Life, og tíðindastovan Reuters hevur skapað teirra egna umhvørvi her.

**Kjakevni:** Hvussu ofta kannar tú sms og teldupost? Verða vit trælir av on-line samfelagnum? Verða vit klókari ella bara stressað í on-line samfelagnum?

# *Hvørji árin hava fjølmiðlar á samfelagið?*

**vanar** **ávirkan**

Latið okkum siga, at ein stórur partur av fólkinum í landinum broytir hugsan, hugburðir og atferð eftir tí tey síggja, hoyra og lesa í fjølmiðlunum. Hetta er t.d. kent frá mótaverðini. Lýsingar í sjónvarpi, bløðum, vikubløðum og á netinum ávirka fólk soleiðis, at tey fara at klæða seg eftir nýggjasta mótanum. Fjølmiðlarnir ávirka eisini soleiðis, at fólk fáa nýggjar vanar: leggja av at roykja, fara at súkkla og renna, ella ganga túrar í staðin fyri at koyra í bili. Keypa tey bil, skal hann vera tryggur og umhvørvisvinarligur og kosin av miðlafólki sum ársins bilur. Tey fara at eta grønt eftir uppskriftum í miðlunum og smakka eksotiskt vín av tí slagnum, sum miðlarnir viðmæla.




*Tveir bilar eru kosnir heimsins bestu: ein Opel og ein Toyota. Fyritøkurnar, ið selja, lýsa niðast á báðum síðunum í Vikublaðnum. Mynd: Birgir Kruse*






*AME búmerki. Í 2007 var tiltakið hildið í Reykjavík og í Havn. Nýggjur rokkbólkur, sum flestu varnaðust, var Boys In A Band (tv).*

**Atlantic Music Event** **konsertuppliving**

Tøkniligu framstigini innan samskifti gera tað møguligt at flyta vitan og mentan á nýggjan hátt. Hugsa bara um, tá ið útvarp kom, og hvørt hús kundi sita og lurta eftir frásøgn frá kappróðri, fótbóltsdysti ella tónleikaframførslu, ímeðan hesi tiltøk fóru fram aðrastaðnis í landinum. Og ikki um at tala, tá ið "Ársins songrødd" ella "Prix Føroyar" varð varpað beinleiðis út í Kringvarpinum.

Miðlarnir órógva eisini konsertupplivingina hjá teimum, ið eru á staðnum. Tiltakið AME (Atlantic Music Event), sum avloysti Prix Føroyar, verður ikki sent í Kringvarpinum. Fyrireikararnir siga, at tiltakið skal vera ein konsertuppliving, har ljós og ljóð skal vera vent móti áhoyrarunum einans. Ljós og ljóð skal ikki vera merkt av tekniskum krøvum, ið Kringvarpið setir, so sendast kann víðari.

**avleiðingar**

Tá ung fólk í Keypmannahavn vóru koyrd úr ungdómshúsinum á Nørrebrúgv, gjørdu tey uppreistur á gøtuni. 1. mars 2007 noyddist løgmálaráðharrin at heita á donsku fjølmiðlarnar um at sissa seg, tí ávirkanin kundi gerast ógvuslig og fáa óhepnar avleiðingar. Tíðindini frá donsku miðlunum vóru sama dag send í Føroyum.



*Journalistar til arbeiðis á Nørrebrúgv í Keypmannahavn 1. mars 2007.*
*Mynd: Bárður Eklund.*




*Orson Welles ger útvarpsleikin War of the Worlds í 1938.*

**uppaling**

Vit kunnu siga, at fjølmiðlar ávirka okkum og samfelagið. Men tað, tú fært í uppalingini í familjuni, í nærumhvørvinum og í skúlanum, hevur ógvuliga stóran týdning fyri, hvussu tú tekur ímóti ella letur teg ávirka av teim árinunum, ið spjaðast ígjøgnum fjølmiðlarnar.

**Kjakevni:** Kanna eftir hvat hendi, tá Orson Welles (1915-1985) í 1938 gjørdi útvarpsleikin *War of the Worlds.*

**Kjakevni:** Kunnu tíðindi í Degi og Viku øsa alla tjóðina?

**Kjakevni:** Kann eitt fløgummæli í Dimmalætting ávirka títt keyp?

# *Miðlarnir savna áhugan - og pening*

**innsavningartiltøk**
**góðgerandi endamál**

Fyritøkur brúka hópin av pengum til lýsingar í fjølmiðlunum. Almennir stovnar brúka eisini pengar til lýsingar. Politiskir flokkar og einstaklingar brúka nógvan pening til at føra valstríð í fjølmiðlunum, bæði til løgtings- og kommunuval. Innsavningartiltøk til frama fyri eitthvørt góðgerandi endamál fáa góða undirtøku, um tey fáa innivist og verða umrødd í fjølmiðlunum.




*Skalvalop áFlateyri í Súðavík í Íslandi og flóðaldan í Asiu 2004.*

*Sjónvarpsverturin Sigrún Brend fylgir spent við, meðan pengarnir koma inn. Mynd: Kringvarpið*

**náttúruvanlukka**
**Reyði Krossur**
**neyðstødd**

Hugsa bara um innsavningina til teirra, ið rakt vórðu av náttúruvanlukkuni í Súðavík í Íslandi í 1995, ella av flóðalduni í Ásia á jólum 2004. Stór konsert varð send bæði í útvarpi og sjónvarpi, og Reyði Krossur upplýsti, at føroyingar eftir stuttari tíð høvdu savnað 7 mió. kr. til tey neyðstøddu í Ásia.

Eru føroyingar við í útlendskum kappingum, ið sendar verða í sjónvarpi har, so halda vit við "føroyinginum" og vilja sleppa at atkvøða fyri teimum í fremmanda landinum. Ber so á, at føroyingurin eru á vinnandi liðnum, so gleðast vit og siga, at vit hava vunnið. Gleðisøgan kemur ovast á breddan hjá øllum føroysku miðlunum.

**ítróttur**
**lýsingar**
**tíðindi**
**Formula deildin**

Peningur er stórur partur av ítrótti, bæði heima og úti. Vanligt er, at fyritøkur lata fitt av peningi fyri at verða nevndar í kappingum, sum t.d. Formula deildini. Tá sent verður frá dystum, slepst tí ikki undan at nevna fyritøkurnar.
Kringvarpið hevur sett seg ímóti hesum og noktar at nevna annað enn "Fremstu deild".

Til tess at undirstrika markið millum lýsingar og tíðindi nokta journalistar í Kringvarpinum at lesa lýsingar.
Hinvegin er tað ein sannroynd, at stjórar í týðandi miðlum, sum eru óheftir, samstundis hava verið limir í nevndum hjá peninga- og tryggingarstovnum í landinum. Summir journalistar eru eisini í politikki.




***Undirhundar***
*er yvirskriftin hjá teknaranum Óla P., tá hann avmyndar blaðstjórarnar á Sosialinum og Dimmalætting: "Við hóttan um príshækking, nú valár er, hava óheftu bløðini fingið týðiliga ábending um, hvussu skrivast skal". (Sosialurin 9. oktober 2001)*

Á Norðoyastevnu byrjar føroyameistarakappingin í kappróðuri. Men í 2007 fall Norðoyastevnan saman við einum EM fótbóltsdysti millum Føroyar og Italia. Kringvarpið heitti tí á klaksvíkingar at flyta aldargamla og siðbundna kappróðurin.

Alt hetta sigur okkum, at vit lata okkum ávirka av tí, ið er frammi í fjølmiðlunum. Ávirkanin kann gerast so miðsavnað, t.d. kring fótbólt, at hon fær bæði fíggjarligar og politiskar avleiðingar.

**fíggjarligar og politiskar avleiðingar**

Føroysku bløðini, sum eru til sølu í kioskunum, hava oftani trong kor. Tey hava ikki almennan pening at dúva uppá, men mugu skriva tað, sum lesarin vil keypa. Soleiðis ger oddagreinsskrivarin í Dimmalætting vart við peningaligu støðuna hjá bløðunum, mótvegis loftmiðlunum:

**oddagrein**

*Síðan almenni stuðulin til loftmiðlarnar varð minkaður, máttu stovnarnir leggja seg eftir lýsingapengunum. Í Føroyum er talan um ein stóran pott, har útvarpið og sjónvarpið háløðu ein stóran part til sín, so holið eftir horvna rakstrarstuðulin kundi fyllast. Minni var til bløðini, sum til sína hædd kunnu hava eini tíggju fólk í journalistiskum starvi, loftmiðlarnir tað dupulta.*
*Síðan setti útvarpið hol á "sponsoreraðar" sendingar, og millum annað "Jolly" stuðlaði sendingini Náttarravnarnir, har Høgni Djurhuus sjálvur var ein partur av manningini.*
*Hinir miðlarnir tóku eftir, tí undirhald selur. Tað er bara at hyggja á sjónvarpsskíggjan, tá sjónvarpsmanningin fer til Oyggjaleikir ella landsdystir. So stuðla Smyril Line, Atlantsflog, peningastovnarnir ella onkur annar. Soleiðis verða pengarnir skavaðir saman fyri at geva hyggjarunum nakað…*
*Undirhaldið selur. Tað handlar um pengar. Tað handlar um at yvirliva. So mugu miðlarnir prioritera sum frægast við hinum tøku kreftunum. Tað er har avbjóðingin liggur hjá eini journalistiskari leiðslu, sum ongantíð má lata seg kúga ella keypa. Tað er lættari sagt enn gjørt, men tey fáu fólkini á føroysku redaktiónunum gera sum heild eitt megnararbeiði - tað er bara vónleyst at samanbera tey við avrik framd á redaksjónum við tíggjufalt so nógvum fólkum í øðrum londum.*

**Kjakevni:** Hvør stovnur í landinum man brúka mest pengar til lýsingar í fjølmiðlunum?

**Kjakevni:** Hevur tú kent teg ávirkaðan at lata pening til eitt endamál, tí tað hevur verið frammi í miðlunum?

# *Harðskapur í fjølmiðlunum*

**harðskapur**

Flestu okkara hava ivaleyst sæð harðskap á DVD-filmum og eisini í tíðindasendingum í Kringvarpinum. Vit síggja bumbumenn í Miðeystri festa bumbubelti um miðjuna, biðja ein bøn og fara í ein buss og bresta alt í luftina. Eisini síggja vit skúlanæmingar í Skotlandi, Týsklandi og USA, ið hava tikið skotvápn við í skúla og skjóta frá hond. Nógv liggja eftirá, og at enda taka teir seg sjálvan av døgum. Hin ringasta hendingin var í Blacksburg í Virgina, USA, hin 16. apríl 2007, tá 32 fólk doyðu. Hóast vit verða skakað av hesum blóðigu gerðum, fara vit ikki upp í bussar ella inn í skúlar at fremja sama harðskap.






*Filmsleikarin Charlton Heston var 1998-2003 formaður í National Rifle Association.*

*Bowling for Columbine (Michael Moore 2002) lýsir leiklutin, ið skotvápn hava í amerikanska samfelagnum. Samstundis fáa vit innlit í skotbardagan á Columbine High School í 1999, tá 14 fólk doyðu.*

**uppaling**

**virði og normar**

Flestu okkara hava í uppalingini lært og meina veruliga, at sumt eiga vit ikki at gera, tí tað kann vera okkum sjálvum og øðrum til bága. Vit hava fingið okkum virði og normar, ið so við og við eru vorðin rættiliga grundfest. Vanliga er uppalingin, sosialisatiónin, sterkari enn tilvildarlig ávirkan frá einum DVD-filmi, sum er fyltur við harðskapi. Úrslitið av ávirkanini vil so verða eftir, um tað samsvarar við okkara kenslur, tankar og tað, vit hava álit á.

Tað er eitt afturvendandi kjakevni, hvørt harðskapur í fjølmiðlum sum DVD-filmum og telduspølum hevur ringa ávirkan á okkum. Í teimum førum, har hetta tykist gera seg galdandi, kann orsøkin heldur vera, at talan er um fólk, ið ikki hava so góðar sannroyndir í uppalingini.

**ung í náttarlívinum**

Eftir at knívar í fleiri førum hava verið brúktir í samanbrestum millum ung í náttarlívinum í Havn í januar 2007, sigur ein løgreglumaður í viðtali:

*Tey allar flestu ungu fólkini eru bæði fitt, skilagóð og veruliga væl upplýst hampafólk. Men so er tað nøkur - og møguliga eru tey eisini ávirkað av videospølum við harðskapi - sum ikki duga sær hógv. Broytingin er ikki hend beint nú. Fyri tveimum árum síðan var støðan eitt skifti tann sama, og nú tykist tað sum eitt rák.*

*(Brot úr samrøðu, Dimmalætting 12. januar 2007)*




*Natural Born Killers (1994) er bannaður at vísa í Føroyum.*

**telduspøl**
**filmar**
**Miðlaráð**

Ein sálarfrøðingur sigur 7. februar 2007 við Útvarpið, at telduspøl í veruleikanum kunnu vera meira skaðilig enn filmar. Sálarfrøðingurin hevur verið við í gamla Filmseftirlitinum, ið setti aldursmark á filmar í biografunum. Í nýggja Miðlaráðnum, ið er komið fyri Filmseftirlitið, fara tey at leggja størri dent á kunning enn á forboð og eftirlit.

**happingarmentan**

Næstsíðsta vikuskiftið í mars 2007 verður ein 16 ára gamal drongur álopin av fýra eldri dreingjum í miðbýnum í Havn. Løgreglan stendur á berum, allir miðlar taka málið upp, og Útvarpið sigur hetta vikuskiftið:

*Politiið í Havn sóknast eftir vitnum til eina álvarsliga hending uttan fyri Tinghúsið sunnunáttina. Ein 16 ára gamal littur drongur varð skorin í andlitið og illa sparkaður av fýra dreingjum, sum vóru um 20 ára aldur. Tann 16 ára gamli varð so skelkaður, at hann rýmdi til hús, uttan at melda málið til politiið. Málið var kortini meldað seinnapartin í gjár. Politiið sóknast eftir vitnum, sum hava sæð tilburðin ella vita okkurt um hann. Enn er ongin av álopsmonnunum handtikin. (Tíðindi innanlanda, www.uf.fo 26. mars 2007)*

Í morgunsendingini í Útvarpinum dagin eftir verður upplýst, at einki nýtt er í málinum um álopna drongin í Havn. Ein fólkaminnisfrøðingur og ein løgreglumaður verða spurdir um hendingina, og um hvat man búgva undir harðrenda atburðinum hjá ungum. Fólkaminnisfrøðingurin vísir á, at vit liva í eini happingarmentan. Dømi um hetta eru hevdvunnu tættirnir hjá Nólsoyar Páll, og at mentamálaráðharrin sigur, at vit liva í heimsins besta landi. *Tað gera vit ikki,* sigur frøðingurin. Løgreglumaðurin nevnir hinvegin, at tey ungu síggja so nógv í dag, bæði á filmi og sjónvarpi. *Saman við rúsdrekka kunnu hesi viðurskifti vera orsøkin til harðrenda atburðin,* sigur løgreglumaðurin.

*(Góðan morgun Føroyar, Útvarpið 27. mars 2007)*

**foreldur**

Í blaðnum Trúboðin verða mamma og pápi at tveimum børnum, sum eru 4 og 8 ára gomul, spurd um harðskap í telduspølum. Foreldrini síggja tað sum ein stóran trupulleika, at nógv av spølunum, ið børn spæla, eru harðskapsspøl, har blóðið flýtur, og har tað bara ræður um at drepa onnur. – Vit halda ikki, at hesi spølini eru góð fyri børn. Tey eru niðurbrótandi heldur enn uppbyggjandi. Vit hava jú eina lóg, sum sigur, at tað ikki er loyvt at sláa børn. Eg hugsi, at tað er ikki uttan grund. Børnini koma inn í eina aðra verð, og so spæla tey, sum um tað er veruligt. Tey ávirkast týðiliga av hesum. Vit síggja tað í teirra fría spæli og práti, at tað, ið tey spæla og práta um, er tað, tey hava spælt á telduni ella sæð í sjónvarpi, sigur mamman.

*(Trúboðin 6. mars 2007)*



***Hvat hendur millum okkum og skíggjan?*** *Í Göteborg hevur UNESCO skrivstovu, har Cecilia von Feilitzen (f.1945) granskar og kunnar um harðskap á filmi og í telduspølum. UNESCO er stovnur undir ST, ið arbeiðir við mentan, gransking og útbúgving.*

**Kjakevni:** Hvat merkir tað, at hava góðar sannroyndir í uppalingini?

**Kjakevni:** Hevur tú nakrantíð spælt telduspøl saman við foreldrunum?

**Kjakevni:** Hvat sigur ST-stovnurin UNESCO um harðskap á filmi og í telduspølum?

# *Lýsingar og fjølmiðlar*

**sálarfrøðiliga** **kenslur** **dulvitið** **tørv**

Tey, ið gera lýsingar, vita nógv um tað sálarfrøðiliga, sum býr í myndum og miðlum. Tá ið tey gera eina lýsing, royna tey at fáa greiði á, hvørjar kenslur og hvønn tørv móttakarabólkurin hevur. Lýsingin sigur nakað um, at júst henda vøran er tann, tey hava fyri neyðini, og sum teimum hevur longst eftir, og sum tey hava droymt um.

Lýsingin byggir á teir tankar, hugburðir og tey virði, sum móttakarin longu hevur. Móttakarin er minni enn so altíð greiður yvir og tilvitaður um hetta. Sagt verður, at lýsingar ávirka dulvitið.

Besta høvi at lýsa, er tá ein sjónvarpsrøð velur at brúka eina vøru. Hvør skal siga, tá tey brúka vøruna, so er hon eisini nóg góð til mín. Og kanska fari eg at kenna meg serliga væl, um eg eri ílatin sum ein kend stjørna.




*Lýsing frá Føroya Banka: Tá eg verði stór, vil eg eiga ein banka! Mynd: Føroya Banki*

*Sofie Gråbøl í føroyskari troyggju. Mynd: DR*




**sjónvarpsrøð** **troyggja** **Guðrun & Guðrun**

Høvuðsleikarin í donsku sjónvarpskrimirøðini "Forbrydelsen" Sofie Gråbøl er í eini føroyskari skipstroyggju. Tað er fyritøkan Guðrun & Guðrun, ið hevur sniðgivið. Í fyrsta umfari er hetta ein spennandi søga um eina væleydnaða vøru. Síðani hendir tað, at troyggjan verður so nógv eftirspurd, at danskar bindibúðir taka mynstrið og gera egnar troyggjur at selja. Tað er ikki loyvt. Nú kemur søgan aðru ferð framm og øll vita um troyggjuna.

**Kjakevni:** Er munur á føroyskum og útlendskum reklamufilmum í Havnar Bio?

**Kjakevni:** Hvat er tað fyrsta, ið fangar teg, tá tú hyggur at reklamufilmi?

# *Virði og hugburðir koma ikki av sær sjálvum*

**virði og hugburðir**

Tey virði og teir hugburðir, sum vit bera við okkum, hava vit fingið úr samfelagnum, sum vit eru partur av. Frá familju og vinum, skúla og arbeiðsplássi og eisini frá fjølmiðlunum.

**trygt nærumhvørvi**

Flestu okkara hava kanska royndir við, at tey vaksnu uttan um okkum í nærumhvørvinum ikki júst pota virði og hugburðir niður í okkum. Heldur vísa tey virðing og áhuga fyri okkum og siga okkum, tá ið vit gera okkurt gott, og tá ið vit gera okkurt, ið ikki er gott.

Fjølmiðlarnir hava vanliga ikki sama møguleika, sum okkara nærmastu at geva okkum svar. Bera teir okkum hugburðir og virði, sum ikki samsvara við tað, vit hava fingið frá okkara nærmastu, er tað sannlíkt, at hetta ikki ávirkar okkum.

Er nærumhvørvið ikki trygt og ikki støðufast – og tað kunnu vera ymsar grundir til tað – er tað sannlíkari, at ávirkanin frá fjølmiðlunum er størri.




*Trygt og hugnaligt nærumhvørvi minkar um ávirkan frá fjølmiðlum. Mynd: Plátuhúsi hjá Røde Mor 1976.*

Hava vit ikki eitthvørt virkið og spennandi at takast við í nærumhvørvinum, fer størri og størri partur av tíðini við at sita framman fyri telduella sjónvarpsskíggjanum. Tann tíðin, ið verður bundin til miðlarnar, kundi verðið brúkt til okkurt annað.

Eitt annað, vit skulu geva okkum far um, tá ið vit tosa um fjølmiðlar og ávirkan, er, at tað er ikki líkamikið, hvør persónur ella hvør fjølmiðil ber tíðindini ella boðini. Vit hava lyndi at trúgva einum persóni, vit kenna og hava álit á. Ikki minst um viðkomandi er valdur politikari við nógvum atkvøðum, gongur í kirkjuna ella samkomuna, har vit plaga at koma ella spælir fótbólt á tí liðnum, vit halda við.

**narkomál**

Eisini mátin at bera somu tíðindi kann verða ymiskur. Í apríl 2007 var eitt stórt narkomál viðgjørt í rættinum. Fyri fyrstu ferð var ein kvinna høvuðsákærd í tílíkum máli. Hvør á sín hátt, søgdu allir miðlarnir frá gongdini í rættinum.

**kvinna**
**maður**

*Henda 30 ára gamla kvinnan má hóast alt sigast at vera ein sterk kvinna. Hon hevur møtt nógvum trupulleikum í sínum lívi og hevur verð misnýtari, men vitinum bagir einki, og hon dugir væl at tosa og seta orð á sínum tankar. Í rættinum mánadagin kom hon við eini sterkari lýsing av lívi sínum.*

*(Brot úr grein, Dimmalætting 17. apríl 2007)*

*30 ára gamla kvinnan hevur 34 ákærur ímóti sær. Flestu teirra um rúsevni, men so eru eisini aðrar meiri sjálvsamar ákærur. Millum annað ákæra nummar 33, sum er um grova embætismisnýtslu og tjóvarí, har hon hevur játtað seg seka í at hava stolið heilivág frá einum avlamispensjónisti, sum hon var heimahjálp hjá.*

*(Brot úr grein, Sosialurin 17.apríl 2007)*

Báðar frásagnir eru frá sama rættarfundi. Fyrra greinin er skrivað av kvinnu, meðan ein maður skrivar hina seinnu. Skilligt er, at menn og kvinnur hugsa og endurgeva ymist frá somu hending og hava ymsar førleikar at seta seg í støðuna hjá umrøddu persónunum.



**rættarsalur**
**blaðteknari**

*Í rættarsalinum er ikki loyvt at fotografera ella gera upptøkur. Tí brúka bløðini blaðteknarar. Her situr høvuðsákærda kvinnan við síðuna av verjanum. Janus Guttesen teknaði í Dimmalætting 9. mai 2007.*

**Kjakevni:** Hevur tað nakran týdning fyri teg, um ein persónur, tú kennir, fer upp í politikk? Hevði tú valt henda persónin, tí tú kennir hann?

**Kjakevni:** Er ymist, hvussu menn og kvinnur bera okkum tíðindi?

# *Sannleikin doyr fyrst*

**krígssøgur**

Tá sagt verður frá krígssøgum kring knøttin, er trupult at meta um, hvør hevur rætt. Sum í øllum ósemjum eru í minsta lagi tveir partar. Tá kann verða trupult at líta á tíðindi, sum bara koma frá øðrum partinum. Ofta er tað so, at tíðindafólkið bara sleppur fram at øðrum av teim stríðandi pørtunum og ikki hinum. Amerikanski senatorurin, Hiram Johnson, (1866-1945) segði í 1917 *"The first casualty when war comes, is truth"*.

Hin 27. apríl 2007 segði BBC at Somalia er tað landið, sum í søguni allari er harðast rakt av kríggi. Onga aðrastaðni hava so nógv fólk mist hús og heim sum í Somalia. Hóast keldan er ST, ber eingin søguna. Í staðin fylla søgur úr Miðeysturi myndina, eins og tær hava gjørt í mong ár. Har er støðan ikki so ring sum í Somalia.

At bera tíðindi av hermótinum í Russlandi er beinleiðis vandamikið. Staðfest er at journalistar, sum siga søgur úr Kekkenia, verða jagstraðir av myndugleikum, missa starvið ella verða dripnir. Siga russiskir journalistar søgur um rýmingar, eru báðir partar í vanda og mugu liva undir jørð.



*Bukaður russiskur hermaður, ið er rýmdur, tí hann vil ikki til Kekenia. Hann livir sum rýmingur undir jørð. Aftanfyri eru horvnir hermenn. Eingin sigur teirra søgu. Mynd: Birgir Kruse.*

Hin 23. mars 2007 vóru 15 bretskir herflotamenn tiknir fangar í Persaflógvanum, tí teir vóru komnir inn í iranskt sjóøki. Vesturheimurin heldur við bretunum, men eftir at tey verða latin leys, vísir almenna iranska sjónvarpið upptøkur, har tey bretsku fólkini hava tað gott, flenna og hugna sær:

**propaganda**

*Iran hevur almannakunngjørt sjónbandsupptøkurnar, sum vísa teir 15 bretsku sjómenninar, sum vóru tiknir til fanga í knappar tvær viku, har teir telva, spæla borðtennis og hyggja í sjónvarp. Upptøkurnar eru vístar í almenna iranska sjónvarpinum Al-Alam. Iranskir myndugleikar vilja vera við, at hesar upptøkur avsanna frágreiðingarnar hjá bretsku sjófólkunum um, at tey vóru illa viðfarin, meðan tey sótu fangar. Fleiri av teimum leyslatnu hava greitt frá, at tey fingu bind fyri eyguni, og sótu avbyrgd í køldum klivum úr steini, og at tey vórðu noydd at viðganga, at tey høvdu verið í iranskum sjógvi.*
*(Kringvarpið 9. april 2007)*

Hvør hevur nú rætt? Er hetta bara propaganda, sum skal fáa okkum at halda við fíggindanum? Sjálvt eftir at stríðið er av, er enn ósemja um, hvussu hendingin skal útleggjast, og hvat veruliga fór fram.






*Winston Churchill á forsíðuni á Life Magazine í 1945 og upprunaliga myndin hjá kanadiska myndamanninum Yousuf Karsh (1908-2002) frá 1941. Orsøkin til at Churchill er so illbrýntur er, at Karsh púra óvæntað tók sigarina frá honum eitt evarska lítil bil, meðan myndin varð tikin. Myndin varð standandi til kríggið var av. Mynd: Life Magazine /Yousuf Karsh.*

**Churchill**

Bretski forsetin, Winston Churchill, (1874-1965) var eisini hermaður og rithøvundur, ið dugdi serliga væl at taka til. Einaferð skal hann hava sagt:

**truth is precious**

*"In wartime, truth is so precious that she should always be attended by a bodyguard of lies."*

Samskiftisleiðarin í danska herinum H.C. Mathiesen, (f.1966) oberst-loytnantur, vísir orðum Churchill's aftur. Í einum fyrilestri hjá UNESCO fyri tíðindafólkum sigur hann, at tað mestur munnu verða miðlarnir sjálvir, ið hava ein trupulleika:

**Kommunikationsprisen**

*Spørgsmålet er ikke så meget om forsvaret er klar til de væbnede konflikter. Spørgsmålet er snarere om medierne er rustet til at rapportere ude fra konflikterne, fordi det er umådeligt besværligt, farligt og problematisk at dække begge sider af en konflikt. Vi vil fra forsvarets side hjælpe så godt vi kan, for i dag er der ikke kun fokus på løsning af den politisk stillede opgave. Der er naturligvis også fokus på løbende at kommunikere status. Og det sker blandt andet i samarbejde med danske medier. Krigens første offer behøver ikke være sandheden!* *(H.C.Mathiesen: Kommunikation om forsvaret under væbnede konflikter. Mål og midler 2003-2010)*

Sama árið, tað var í 2006, fekk H.C. Mathiesen serligu samskiftisvirðislønina, Kommunikationsprisen, frá danska hernaðarráðharranum, Søren Gade. Men tá arbeiddi Mathiesen á hermótinum har suðuri í Afganistan.

**Kjakevni:** Hevur tú nakrantíð hoyrt nakað í miðlunum, sum tú hevur kveistra til viks, tí tað var propaganda?

**Kjakevni:** Hví mundi amerikanski senatorurin Hiram Johnson siga "The first casualty when war comes, is truth" í 1917?

# *Veruleikin ritstýrdur*

Í einum fólkaræðisligum samfelag sum okkara er tað ikki vanligt, at myndugleikarnir leggja seg út í, hvørji tíðindi og boð fjølmiðlarnir bera. Hóast hesa gongd hava vit hópin av eftirliti við fjølmiðlum. Lógir eru um ábyrgd og góðan fjølmiðlasið, og at sendingar skulu vera fjølbroyttar og siðiligar. Ikki er loyvt at lýsa við rúsevnum og pornografi ella at senda harðskapselvandi film.
Kringvarpsstýrið hevur ábyrgdina av tí, sum vit hoyra í Kringvarpinum, og Miðlaráðið hevur skyldu at upplýsa okkum um film og telduspøl.

**public service**

Hugtakið public service verður nevnt í sambandi við Kringvarpið. Í hesum liggur, at Kringvarpið hevur ymsar skyldur, sum privatir miðlar ikki hava. Krøv vera bæði sett til stovnin og til einstaka medarbeiðaran. Stovnurin og medarbeiðarin skulu vera óheftir og sakligir. Men samstundis hevur hvør einstakur medarbeiðari eisini sítt egna frælsi, eitt nú í málburði, tó so at vanligar føroyskar málreglur skulu haldast. Ein kann siga fimmtifimm, meðan hin sigur fimmoghálvtrýss.
Sum menniskju er vit so ymisk. Ein kann verða ótolin og ágangandi, meðan ein annar er sáttligur og letur fólk tosa, til tey eru liðug. Tað er í stóran mun upp til hvørt einstakt tíðinda- og fjølmiðlafólk, hvønn stíl tey velja, men tað er redaksjónin, sum setur krøv til medarbeiðararnar, um at vera óheftar, sakligar og ikki røkja egin áhugamál.

Vit eiga at vera vandin og varin, tá vit brúka fjølmiðlar og gera niðurstøður um álvarsmál, har keldan bara er úr fjølmiðlunum.
Myndin av veruleikanum, sum fjølmiðlarnir bera okkum, samsvarar minni enn so altíð við allan veruleikan. Hevur tú til dømis hugsað um, at Dagur og Vika altíð hevur somu knøppu innsløg, sum til samans geva nett somu longd, kvøld eftir kvøld? Her verður valt út, hvønn part av veruleikanum, vit skulu síggja.



*Grindadráp er ein føroyskur veruleiki. Men eru hetta blóðtystir barbarar, ið møtast á ítróttastevnu, ella eru hetta virðiligir veiðimenn, sum bara vilja hava mat á borðið? Hvør sleppur at ritstjórna? Og hvussu riggar blóð á myndum og í sjónvarpi? Mynd: Ole Wich.*

Meðan Kringvarpið sendir bæði innlendskt og útlendskt tilfar, er annarleiðis í USA. Har er tað bara CNN, ið sendir útlendsk tíðindi. Hinar amerikansku sjónvarpsstøðirnir senda einans innlendsk tíðindi úr egnum nærumhvørvi. Í Russlandi er tað sjónvarpssendingin Vesti, ið merkir boðskapur, ið er hin mest sædda tíðindasendingin. Har senda tey innlendsk og altjóð tíðindi allan sólarkringin. Boðskapurin skal snøggast til og verða átuligur fyri brúkaran, antin talan er um eitt blað, ið er til sølu, ella almenna kringvarpssending, sum kemur inn í hvørja stovu.

Tá fíggjarmálaráðharrin Bárður Nielsen leggur frá sær 9. mai 2007 tekur Kaj Leo Johannesen við uppgávuni sum landstýrismaður fyri Sambandsflokkin. Men tað førir við sær at Heðin Mortensen kemur á Ting. Tað vil sambandsflokkur in ikki og velur ístaðin Magna Laksafoss. Hesir menn og støða teirra verður nógv umrødd í miðlunum. Løgmaður verður drigin so mikið inn í kjakið, at hann í samrøðu við Dimmalætting 15. mai 2007 metir seg verða fyri einum karaktermorði.




*Sjálvmál, fullkomin ruðuleiki og karaktermorð eru yvirskriftir í bløðunum, tá nýggjur landstýrismaður skal finnast í mai 2007.*

**samrøða**

Í samrøðu við Sosialin sama dag sigur samfelagsfrøðingurin Sjúrður Skaale:

*Tað má sigast at vera harmiligt, at stríð og agg millum persónar skal fáa alla umrøðuna, meðan eitt so álvarsligt mál sum lógin um vinnuligan fiskiskap púra verður sett í aðru røð. Tað átti at fingið umrøðu heldur enn Heðin, Jóannes, Kaj Leo ella Høgni. Talan er bara um glantrileik við ongum innihaldi, og tað verður ikki betri av, at fjølmiðlarnir glaðbeintir bera brenni á bálið. (...) Men fjølmiðlarnir eiga sín rætt til at útnytta slik persónsmál, tí tað er nakað, ið øll kunnu fyrihalda seg til, og tí eisini nakað, ið selur fleiri bløð.*

*(Brot úr grein, Sosialurin 15. mai 2007)*

Vituligt er, at undirhald og dramatiskar og óvanligar hendingar eru betri søluvøra enn vanligur gráur gerandisdagur. Serliga tá sent verður beinleiðis. Hetjur og aðrar stjørnur úr popp- og ítróttarheiminum vísa seg at vera meira áhugaverdar enn ein bussførari ella ein flakakona. Men kemur flakakonan til skaða, ella koyrir bussførarin útav, verða tey straks áhugaverd sum tíðindatilfar.

**talufrælsi**

Tí er tað líka so týdningarmikið at geva sær far um tað, sum fjølmiðlarnir ikki bera okkum. Fara aftur um myndina ella út um rammuna.

**Grundlógarnevndin**

**pressufrælsi**

Vit siga at vita hava pressufrælsi, hóast hetta ikki beinleiðis er staðfest í nakrari lóg. Men í donsku Grundlógini verður rætturin at siga sína hugsan tryggjaður:

**Grundlógin**

*Enhver er berettiget til på tryk, i skrift og tale at offentliggøre sine tanker, dog under ansvar for domstolene. Censur og andre forebyggende forholdsregler kan ingensinde påny indføres.*
*(Danmarks Riges Grundlov § 77)*

Í februar 2001 spyr tingmaðurin, Tórbjørn Jacobsen, landstýrismannin í mentamálum, Sámal Petur í Grund, tveir spurningar um, hvørja atgongd politikarar hava til Sjónvarpið. Fyrri spurningurin ljóðar soleiðis:
*Eru ongar reglur fyri, nær ein politikari kann koma at skermi og mikrofon í sjónvarpinum?*

Landstýrismaðurin svarar við at vísa til pressufrælsi og talufrælsi, sum er galdandi í øðrum londum. Hann upplýsir eisini, at Grundlógarnevndin arbeiðir við hesum máli. Síðani verður í sama máli víst til bræv frá stjóranum í SvF, har svarað verður soleiðis:

*Sjónvarp Føroya hevur ongar útgreinaðar reglur um, nær ein politikari kann luttaka í sendingum. Journalistikkurin í eitt nú tíðindum og aktuellum sendingum hjá SvF má sum heild sigast awt byggja á ta rættiliga einsháttaðu siðvenjuna, sum er galdandi í sonevndu Public Service fjølmiðlunum í Norðurlondum. Henda siðvenja byggir á, at tað í hvørjum einstøkum føri verður mett um, hvørji evni eiga at vera tikin upp, lýst og umrødd, og at tað herundir í hvørjum einstøkum føri verður mett um, hvørjar upplýsingar og keldur eiga at verða brúktar til tess at røkka tí yvirskipaða málsetninginum, sum er orðaður í Kringvarpslógini.*
*(www.logting.fo)*

Í seinna spurninginum, sum løgtingslimurin setur landstýrismanninum, verður spurt, um allir politikarar eru líkastillaðir yvir fyri SvF? Landstýrismaðurin letur stjóran fyri SvF svara spurninginum soleiðis:
*Svarið upp á henda spurning er ja. Hetta merkir kortini ikki, at øll mál verða lýst til fulnar í hvørji einstakari sending, men tað eiga tey at verða, tá mett verður yvir ávíst tíðarskeið.* *(www.logting.fo)*




***Tvíkiljan*** *er yvirskriftin hjá teknaranum Óla P. Undir tekningini stendur: "Frágreiðing óneyðug". (Sosialurin 7. september 2000)*

**Kjakevni:** Var nakað í dag, sum tú saknaði í "Degi og Viku"?

**Kjakevni:** Var nakað, ið tú undraðist yvir í somu sending? Og var spurt um nakað í seinastu sending, sum enn ikki er svarað?

# *Talufrælsi og sensur*

Ásetingin um talufrælsi og forboðið **sensur** móti at brúka sensur byggir á tankar frá fronsku kollveltingini í 1789. Síðani hava mong lond ment eina drúgva sið- **fólkaræði** venju, knýtt at hugsanini um fólkaræði.

**pressufrælsi** Í USA er pressufrælsi síðani 1791 tryggjað í Fyrsta grundlógarískoyti, har m.a. sagt verður: *"Congress shall make no law abridging the freedom of speech, or of the press."*

Í 1848 varð pressufrælsi staðfest í danska ríkinum.

Í 1991 vóru somu viðurskifti staðfest í Russlandi. Í russisku grundlógini §29.5 verður sagt, at *"Frælsið hjá fjølmiðlum er tryggjað og at sensurur er bannaður"*.

Russiska fjølmiðlalógin loyvir journalistum at *"leita eftir, finna og spjaða"* upplýsingar, bara talan ikki er um ríkisloyndarmál. Russland hevur sostatt eina fyrimyndarliga lóggávu um fjølmiðlar. Men í dagliga arbeiðnum kann veruleikin vera ein heilt annar, bæði í Russlandi og aðrastaðni.



*Vladimir Putin (f.1952) forseti Russlands*




*Øssur Winthereig (f.1958) við bókini "Skjót journalistin", sum kom fyri jól í 2003. Henda bók, ið er hin einasta, ið lýsir føroyskan journalistikk, fekk løgmann at leggja frá sær. Mynd: Birgir Kruse*

Her heima hoyrist av og á, at politikarar leggja seg út í tíðindi, sum óheftir miðlar bera. Politikararnir vilja sleppa at gera av, hvat er tíðindi og ikki. Í bókini "Skjót journalistin" verður á fyrstu síðu greitt frá, tá løgmaður í juli 2002 hótti SvF, tí Dagur og Vika hevði borið tíðindi, ið honum ikki dámdi. Hóttanin er, sambært bókini, at framtíðin hjá Sjónvarpi Føroya um sama mundi var til politiska viðgerð.

Í Danmark er komið fram, at ráðharrar hava sent teldupostar til týðandi persónar fyri at ávirka tíðindini í Danmarks Radio. Í 2003 hevur Brian Mikkelsen, danskur mentamálaráðharri, sent teldupostar til formannin í Danmarks Radio og sagt seg verða misnøgdan við, hvussu kríggið í Irak verður viðgjørt. Í 2006 hevur Lars Løkke Rasmussen, danskur innlendismálaráðharri, sent teldupostar til leiðsluna í Danmarks Radio og fýlst á, at tey, sum mótmæla sparingum á skúlum og ansingarstovnum, fáa ov nógva umtalu í miðlunum. Tvær vikur seinni fær tíðindaleiðarin fótin.

**journalistikk fyri pengar**
**nýføtt fólkaræði**
**journalistikk og PR**

Sum næsti granni hava Norðurlond sett sær fyri at hjálpa journalistum í Útnyrðingsrusslandi. Hóast landið er risastórt, er tað eitt nýføtt fólkaræði. Fremsta ynski hjá russiskum journalistum er at læra munin millum journalistikk og PR (public relations). Russiskir journalistar eru ikki vanir við at síggja mun á at arbeiða reint journalistiskt og at skriva tíðindi fyri eina verksmiðju ella fyritøku. ”Einki mark er í so máta í Russlandi. Ert tú nóg svangur, so skrivar tú journalistikk fyri pengar frá kelduni”, sigur ein russiskur blaðmaður í samrøðu við danska journalistin Trine Smidstrup í 2003. Ein vinnujournalistur í Skt. Pætursborg, spyr samstundis Smidstrup: ”Kann eg yvirhøvur skriva eina jaliga søgu um eina fyritøku, uttan at tað er PR?”




*Hóast pressufrælsi, sæst forsetin, Ben Ali, hvønn morgun við mynd í fremstu greinini í tunesiska blaðnum La Press de Tunisie. Vit fáa at vita, hvar hann er og hvat hann ger. – Men eru hetta tíðindi? Mynd: Birgir Kruse.*



*Í Russlandi verða atfinningarsamir journalistar myrdir. Anna Politkovskaya (1958-2006) var journalistur á blaðnum Novaya Gazeta, ið fanst at krígnum í Kekenia. Í 2004 skrivaði hon eina kenda bók, sum á donskum fekk heitið ”Putins Rusland.” Anna varð myrd á føðingardegi Putins. Mynd: Wikipedia.*

**Kjakevni:** Hvussu hevði heimsmyndin sæð út, um vit bara hugdu eftir Degi og viku?

**Kjakevni:** Hevði tað passað løgmanni væl, um hann var ovast á breddanum í hvørjum blaði og fyrst í hvørjari tíðindasending? Brúkar løgmaður henda møguleika?

# Veruleikin sum listagrein

Tá ið journalistar skriva í einum blaði, er førleikin at brúka málið fremsta amboð. Í útvarpi ræður um at hava góða rødd, í sjónvarpi góðan framburð og á netinum góðan kjaksið. Soleiðis eru miðlarnir so ymiskir.

Í november 2005 er kjakið um samkynd við at taka seg upp. Fólk eru ørkymlað um, hvat alt hetta endar við. Eitt kvøldið er Høgni møttur til ein fund um hetta evnið á Sjómansheiminum í Havn. Hann letur allar sansir upp, staðfestir hvat hendir og verður sagt. Uttan at leggja afturat ella draga frá skrivar hann opið og sansandi frá tiltakinum:

**sansir**
**staðfestir**

*»Floym yvir meg!«*
*Sjálv seansan við lovsongi, bønarstund og meira lovsongi tekur eini trý korter og minnir mest um eitt møti. Í støðum hitna fólk so frægt, at tey syngja tríraddað. Og onkur trippar, annar klappar, og okkurt amen hoyrist mitt í øllum. Jú, her er av sonnum slóðað fyri einum lívligum fundi.*
*Fríðtór Debes leggur fyri. Hann tosar um ørliga og siðleysa stórbýin, Bábylon, og um hvussu týdningarmikið tað er at biðja, tá ið eitt samfelag er í vanda. Vit liva í eini tíð við rembingum, vil hann vera við. Einki er heilagt longur! Tað, ið fedrarnir virdu sum ónertligar sannleikar, noyðast vit í okkara*




*Í Føroyum eru nakrir journalistar, ið hava gjørt skrivingina til list, heldur enn journalistikk. Ein teirra er Høgni Mohr (f.1968). Hann hevur skrivað í bløðum, í loftmiðlum og fyri lýsingastovur. Høgni kallar seg tekstasmið. Mynd: Birgir Kruse*

*fáfongda forvitni at koppa á og kanna. Á sínum máttmikla skopunarmáli staðfestir Fríðtór síðan við ósvitaligari vissu, hvør ið fíggindin er: Humanisman! Tá hoyrast fleiri amen úr salinum, og onkur murrar samtykkjandi og inniligt: Mmmm ... mmm! Framhaldandi heldur Fríðtór fólki føstum í humanismuni. Hann nágreinar: Fíggindin er ein óndskapsins vera, Sátan, ið hevur latið seg í ein ham av humanismu! Sambært Fríðtóri verða partarnir í hesum avgerandi bardaga sostatt eyðsýndir: Tað er tað góða ímóti tí ónda! Alt skelvur, vil Fríðtór vera við, hóast tað í roynd og veru er bæði kvirt og friðarligt hesa løtuna.*
*Jenis av Rana verður eftir hesa ramligu fundarbyrjan einmælt valdur orðstýrari. Hann takkar við einum sindri av sjálvspei.*
*Tað má vera fyri míni diplomatisku evni, sigur hann, og fólk flenna vinaliga og virðiliga.*
*Lovsongurin aftan á ódramatiska orðstýraravalið er rættiliga countrykendur. Tað kennist næstan sum sita vit øll treytaleyst lukkulig við eitt legubál eina fagra náttar-*

*stund mitt í amerikanska bíbliubeltinum. Ein kona situr yviri av okkum undir lovsonginum. Hon er er um 35 ára aldur, ljóshærd og bringuprúð. Situr við afturlatnum eygum og hellur høvur, meðan hon syngur so hjartaliga: Fyll meg! Floym yvir meg! Tá ið vit løtu seinni fara at syngja ein góðan gamlan, sum Bill kallar hann, eru hann og løgtingsfelagin og læknin burtur í øðrum heimi. Báðir snerkja ógviliga inniligt og samsint, og við eygnalokunum í lási hella eisini teir høvur, meðan teir melodramatiskt staðfesta: Dýrabart er navn títt, Jesus!*

*(brot úr grein, Dimmalætting, 10. november 2005)*

**ummælarin**

Fyri jól 2006 gav Høgni Mohr út bókina "Ali babba og 49 aðrar blaðgreinar". Á bakpermuni sigur høvundurin, at hann aldri hevur gingið á journalistskúla. "Kann væl vera, at júst hetta er orsøkin til, at hann skrivar so frítt og livandi, sum hann ger" sigur útbúni journalisturin, Uni Arge, í einum útvarpsummæli 9. desember 2006.

**tulking**
**álvarsligur**
**speiandi**

Tíðindi skulu verða stutt og greið. Eru tey ikki tað, so er vandi fyri, at greiðu boðini gerast torskild og náa ikki fram. Tíðindaskriving verður tí lættliga stirvin og fátæksligur tekstur. Allir tekstir, sum eru í bókini hjá Høgna, eru blaðgreinar, sum hava staðið á prenti í Dimmalætting og Vinnuvitan. Tí heldur ummælarin, Uni Arge, tekstirnar hjá Høgna upp móti vanligum journalistiskum tekstum og staðfestir, at *"tekstirnir hjá Høgna Mohr eru alt annað enn knappir og orðafátækir. Teir eru litríkir, inniligir og ofta sera undirhaldandi sum hjá einum rithøvundi. Sum lesari merkir tú, at Høgni hugnar sær, meðan hann skrivar, og tú sært hann næstan fyri tær, tá hann nøgdur rakar seymin á høvdið við sínum øðrvísi orðingum. Vónandi verður hansara skriviháttur nýttur sum dømi um góðan og fyrimyndarligan skriviháttur í skúlunum."*

**fordómar**

Tílíkur tekstur er ofta so opin, at rúm er fyri tulkingum. Tá kunnu vit skifta orð, um teksturin er álvarsligur ella speiandi.

Bretski skemtarin Sacha Baron Cohen (f.1971) fer við filminum "Borat" (2006) eitt stig víðari. Við at nýta ógvusligt, speiandi skemt fær hann okkum at flenna eftir egnum fordómum. Úrslitið kann tá verða, at vit gerast klókari og síggja verðina við nýggjum eygum.




*Mynd: Frá filminum Borat (2006)*

**Kjakevni:** Hvar er markið millum at speireka og at vera erligur? Verða fólk hongd út, tá vit endursiga akkurát tað, ið tey søgdu?

**Kjakevni:** Eru Michael Moore og Sacha Baron Cohen ósømiligur og fara yvir um øll mørk í teirra filmum?

# Framtíðin

**miðlar**
**kunningartøkni**

Tá umræður miðlar og kunningartøkni, gongur menningin so skjótt, at vit vita ikki, hvat framtíðin bjóðar. Tey høvdu hildið okkum verið púra býtt, um vit fyri 12 árum síðani søgdu, at størsti miðilin fór at verða so lítil, at vit kundu hava hann í lummanum – fartelefonina. Veruleikin hevur longu fleiri ferðir yvirhálað science fiction søgurnar og fer framhaldandi at gera tað.

**The Children's Machine**

**fátæk og rík**
**One Laptop Per Child**

Men nøkur viðurskifti hava leingi verið greið, m.a. býtið millum fátæk og rík. Meðan heimsins politikarar gera lítið við at javna millum rík og fátæk lond, so hava onnur gjørt nógv burtur úr at vísa á fátækradømi t.d. í Afrika. Teirra millum eru írsku poppstjørnurnar, Bob Geldof, (f.1951) og Bono (f.1960) og amerikanski teldufrøðingurin, Nicholas Negroponte, (f.1943).

Meðan Geldof og Bono hava víst á tørvin á vatni og góðari heilsu, hevur Negroponte víst á telduna sum fremsta amboð at læra og samskifta við. Á ráðstevnu í Tunis 2005 setti hann fram ætlanina um The Children's Machine, ið er ein 100$ telda til næmingar í menningarlondum. Teldan er partur av verkætlanini One Laptop Per Child, sum skal útvega børnum í menningarlondum samband við umheimin.






*The Children's Machine*
*www.laptop.org*

**streym** · **tænastuveitari** · **stættarstríð** · **fjórða mentanarhegnið**

Vit vita, at teldur krevja streym, og skulu vit brúka internetið, so krevst ein tænastuveitari. Um hvørki streymur ella internet eru atkomulig, so eru vit skorin frá hesum samskiftismøguleika. Samstundis kunnu tey, sum búgva í ríku londunum læra seg enn betur at brúka internetið og teir samskiftismøguleikar, sum har eru. Størri verður gjógvin millum tey, ið duga fjórða mentanarhegnið og tey, ið ikki duga hetta hegnið.

**push** · **pull**

Í hesum føri verða ensku orðini push og pull brúkt. Miðlar av push-slagnum fáa vit sendandi inn á okkum, uttan at hava biðið um teir. Miðlar av pull-slagnum taka vit til okkum, tá vit hava stundir og annars hava tørv á teimum.

**veikir brúkarar** · **sterkir brúkarar**

Nógv bendir á at push-miðlarnir venda sær til veiku brúkararnar, meðan pull-miðlarnir venda sær til sterku brúkararnar. Eru veiku brúkararnir samstundis fátækir og teir sterku ríkir, so kann hetta elva til ein djúpa gjógv millum heimsins fólk. Miðlar og kunningartøkni kunnu sostatt elva til eitt heimsumfatandi stættarstríð, sum vit ikki hava sæð áður.

Nú er hesin tekstur um fjølmiðlar komin at enda. Meðan vit tyggja seinasta setningin í brotinum omanfyri, so kunnu vit lesa formælið aftur og lurta eftir sanginum hjá Rolling Stones. Soleiðis gongur alt í ring.

*Góðan arbeiðshug og smæðist ikki at spyrja læraran, journalistin ella hann, ið skrivaði hetta.*

*Uttan spurningar, eingin miðil.*

*PS: Hetta er hin fyrsta føroyska talgilda bókin, ið hevur fingið tillutað eitt ISBN-tal, so hervið er ein nýggjur miðil settur í verðina. Hann er tykkara!*




*Ein nýggjur og ódýrur háttur at samskifta við vinfólk er gjøgnum Skype. Hevur tú tøknina, so stendur heimurin opin. Mynd: Birgir Kruse*

**Kjakevni:** Dugir tú fjórða mentanarhegnið? Hvørji eru hini mentanarhegnini?

**Kjakevni:** Ert tú ein sterkur miðlabrúkari?

**Kjakevni:** Fara pengar og keypiorka at hava størri týdning í framtíðini enn nú?

# Tilfar og keldur

## Blaðgreinar

### Dimmalætting

Dimmalætting 13. juli 2005: ”Veikir miðlar” Oddagrein um fíggjarligu støðuna hjá føroysku miðlunum.

Dimmalætting 10. november 2005: “Tú sleppur aldri inn um Himmalsins portur!” Høgni Mohr skrivar frá almennum kjakfundi um samkynd.

Dimmalætting 12. januar 2007: “Óttast harðliga rákið” Samrøða við lørgelumann um harðskap millum ung í náttarlívinum.

Dimmalætting 9. februar 2007: ”Føðingardagsbarn í kreppu” Árni Dahl, formaður í Málstevnunevndini heilsar Útvarpinum á fimmti ára degnum.

Dimmalætting 6. mars 2007: ”Hartrópandi íslendskur konsul, ódugnaligt føroyskt sjónvarp” Rolf Guttesen skrivar lesarabræv, sum eisini er í hinum bløðunum.

Dimmalætting 14. mars 2007: ”Orrustan um orðini” Øssur Winthereig skrivar lesarabræv, sum eisini er í hinum bløðunum.

Dimmalætting 17. apríl 2007: ”Er styrkna í varðhaldinum”. Grein um høvuðsákærdu kvinnuna í einum narkomáli.

Dimmalætting 17. apríl 2007: ”Tað hendi aftur” Oddagrein um skottilburð í USA.

### Sosialurin:

Sosialurin: Við ársbyrjan 2007 hevði Páll Holm Johannessen eina greinarøð í Sosialinum um politikk og spunasmíð (spin). Greinarøðin byggir á samrøður við einstaklingar.
Í hesi bók verður víst til tvær samrøður: Óluvu Zachariasen og Per Højgaard.

Samlaða greinarøðin er henda:

Sosialurin 26. januar 2007: ”Spunasmiðir gera innrás í føroyskan politikk” samrøða við kunningarráðgevan Bjørt Samuelsen.

Sosialurin 2. februar 2007: “Ovbyrjaðar tíðindadeildir” samrøða við útvarpskvinnuna Óluva Zachariassen.

Sosialurin 9. februar 2007: ”Fjølmiðlarnir gera politikk til ein stóran sjónleik” samrøða við politikaran Jóhn Dahl.

Sosialurin 16. februar 2007: ”Spinn er partapolitiskir miðlar í nýggjum hami” samrøða við politikaran Høgna Hoydal.

Sosialurin 23. februar 2007: ” Nógv spinnarí er íspunnið” samrøða við samskiftisráðgevan Per Højgaard.

Sosialurin 2. mars 2007: ”Journalistarnir hava mist monopolið” samrøða við kunningarfrøðingin Rúnar Reistrup.

Sosialurin 30. mai 2000: “Dreingirnar mistu tamarhaldið” Um hendingina, tá dreingir fóru at skjóta við byrsu.

Sosialurin 30. mai 2000: “Teir hava helst øst hvønn annan”. Sálarfrøðingur ger viðmerkingar til hendingina omanfyri.

Sosialurin 30. mai 2000: ”Hetta má aldrin henda aftur”. Foreldur gera viðmerkingar til hendingina omanfyri.

Sosialurin 17. apríl 2007: ”Ræðuleikin í Virginia” Oddagrein um skottilburð í USA.

Sosialurin 18. apríl 2007: ”116 viagrabollar sum gávu” Grein um høvuðsákærdu kvinnuna í einum narkomáli.

## Trúboðin

Trúboðin 15. mars 2007: ”Spælir teldu saman við børnunum” Samrøða við foreldur um børn og telduspøl.

Trúboðin 9. mars 2007: ”Tosa við børnini um telduspøl” Samrøða við foreldur um børn og telduspøl.

Trúboðin 6. mars 2007: ”Mangla góð telduspøl til børn” Samrøða við foreldur um børn og telduspøl.

## Vikublaðið

Vikublaðið 17. desember 2006: ”Øll hava eina meining um meg”. Samrøða við Vígdis Hentze Olsen um kappingina “Kan du danse?”

## Vinnuvitan

Vinnuvitan 3. mai 2007: “Íslendingar miseydnaða kvettroynd móti føroyingum”. Grein um reiðraíið Thor í Hósvík. Í web-útgávuni verður orðið “Landasvíkjari” brúkt í yvirskriftini.

## Bøkur og frágreiðingar

”Blíð er summarnátt á Føroyalandi” Jógvan Isaksen, Mentunargrunnur studentafelagsins 1990

”Bløð” Janus Øssursson í ”Føroyar II” Dansk-Færøsk Samfund 1958

”Frágreiðing um grundlógararbeiði” Grundlógarnevndin 2001

”Kommunikation om forsvaret under væbnede konflikter. Mål og midler 2003-2010”
Tala, ið H.C.Mathiesen helt á UNESCO ráðstevnu á Christiansborg í Keypmannahavn 16. mars 2006.
Talan sæst her: HYPERLINK “http://us.uvm.dk/int/unesco/unescohjem/Tale-H.-C.Mathiesen.doc” http://us.uvm.dk/int/unesco/unescohjem/Tale-H.-C.Mathiesen.doc

“Medieváldets påverkan. En kortfattad forskningsöversikt” Cecilia von Feilitzen, Nordicom 2001

”Putins Rusland – når magt korrumperer” Anna Politkovskaya donsk útgáva Høst & Søn 2005

”Skemt” Árbøkur Óli Petersen, Sosialurin, her eru brúktar árbøkurnar 2000-2006

”Skjót Journalistin” Øssur Winthereig og Grækaris Djurhuus Magnussen, Forlagið Steyrin 2003

”Uddannelsesbehovet for journalister i Nordvest-Rusland” Trine Smistrup rapport 2003

## Filmar

Fleiri filmar eru gjørdir um journalistar og teirra arbeiði. Teir kunnu vera álvarsligir og skemtiligir, ella søguliga staðfestandi. Klassikarin er "Citizen Kane" (Orson Welles, USA 1941). Filmurin lýsir fiktiva blaðstjóran Charles Foster Kane, sum í mangar mátar líkist ríkmanninum og blaðstjóranum William Randolph Hearst (1863-1951). Ummælarar halda, at hesin filmur er hin besti, tá umræður filmisk frásøgusnildi yvirhøvur. Ein annar klassikari, ið eisini er um journalistar, er skemtileikurin "The Frontpage", sum Ben Hecht og Charles MacArthur skrivaðu til sjónleik á Broadway í 1928. Teir høvdu báðir royndir sum journalistar í Chichago. Leikurin er fýra ferðir gjørdur til film í USA: "The Frontpage" (Lewis Milestone 1931), "His Girl Friday" (Howard Hawks 1940) "The Front Page" (Billy Wilder 1974) og "Switching Channels" (Ted Kotcheff 1988). Í filminum "Reds" (Warren Beatty, USA 1981) fylgja vit amerikanska journalistinum John Reed (1887-1920), tá hann við egnum upplivingum lýsir russisku kollveltingina 1917-18. Hesin filmur kann eisini berast saman við "Doctor Zhivago" (David Lean, USA 1965). Hetta eru filmar, ið alment viðgera fjølmiðlar og journalistikk.

Í teim uppgávum og spurningum, ið eru aftast í hesi bók, verður meira gjørt burtur úr hesum úrvaldu filmum, sum eisini eru um fjølmiðlar:

"Kongekabale" (Nikolaj Arcel, Danmark 2004)
"Wag the Dog"(Barry Levinson, USA 1997)
"JFK" (Oliver Stone, USA 1991)
"Hærværk"(Ole Roos, Danmark 1977)
"All the president's men" (Alan J. Pakula, USA 1976)
"Good night, and good luck" (George Clooney 2005)
"Borat" (Sacha Baron Cohen, USA 2006)
"Bowling for Columbine" (Michael Moore, USA 2002)

## Bløðini og heimasíður teirra

www.dimma.fo
www.sosialurin.fo
www.oyggjatidindi.com
www.nordlysid.fo
www.vikublad.fo

## Aðrar heimasíður við tíðindum

www.portal.fo
www.123.fo

## Tíðindastovur

www.reuters.com
www.ritzau.dk
www.ntb.no

## Netstøð annars

Norsk Presseforbund www.presse.no/varsom.asp.
Plakatin, ið rópast "Ver varsom".

Medierådet: Svenskur upplýsingarstovnur, ið kunnar um ávirkan og harðskap: www.medieradet.se

# Leitorð

14. September
266b í revsilógin

## A

Afrika
All the President's Men
AME
Anchor man
Arcel, Nicolaj
Arge, Uni
Atlantic Music Event
Atlantsflog
Avatar

## Á

Ársins songrødd
Ávirkan

B
Bábeltornið
Bankaflytingar
Batman
BBC
Ben Ali
Betri pensjón
Bíblia
Blacksburg
Blaðteknari
Blíð er summarnátt á Føroyalandi
Blogg
Bloggan
Bløð
Bókmentir
Bono
Borat
Bowling for Columbine
Boys In A Band
Bratz
Brend, Sigrún
Bronx radio
Brúkarabólkur
Bumbumenn
Búmerki
Bøkur

C
Children's Machine
Churchill, Winston
Clash
Clooney, George
CNN
Cohen, Sacha Baron

D
Dagblaðið
Dagur og Vika
Dalsgarð, Arnbjørn Ó.
Danmarks Radio
Dannebrog
Dans
Dansikapping
Dimmalætting
Disney
Djordjevic, Joan M.
Djurhuus, Høgni
Drewsen, Eyðfinn
Dulnevnd
Dulvitið
DVD

E
Eftirlit
Eivör
Eklund, Bárður
Elvis
Etikkur
Euro Sport
Expert
Eydnuspøl

F
Familja
Fartelda
Fartelefon
Feilitzen, Cecilia von
Ferðafrásagnir
FF-blaðið
Fíla
Filmur
Filmseftirlitið
Finnmørkin
Fiskavørur
Fiskivinna
Fjórða mentanarhegnið
Fjølmiðlaábyrgd
Fjølmiðlanevnd
Fjølmiðlar
Fjølmiðlasiður
Fjølsamskifti
Flagg
Fleet Street
Flóðalda
Fløguummæli
Forboð
Forbrydelsen
Forchammer, Jette

Fordómar
Formula deildin
Formæli
Fóbóltur
Fólkaminnisfrøðingur
Fólkaræði
Fregnir
Fremsta deild
Fyrimynd
Føroya Banki
Føroya Blaðmannafelag
Føroya Skúlabókagrunnur
Føroyameistari
Føroyatíðindi

G
G! Festivalurin
Gallup Føroyar
Gallup, George H.
Gallupkanning
Gazprom
Gekkurin
Geldof, Bob
Geymi
Global village
Godtfred, Bogi
Good Night, And Good Luck
Grindadráp
Grund, Sámal Petur í
Grundlógarnevndin
Grundlógin
Gråbøl, Sofie
Guðrun & Guðrun
Gutenberg, Johann
Guttesen, Janus
Guttesen, Rolf

H
Handilsvøra
Hansen, Maiken Háberg
Hansen, Pauli
Happingarmentan
Harðskapsspøl
Harðskapur
Harry Potter
Hathiesen, H.C.

Havnar Bio
Heavy rokk
Heilaga landið
Heimasíða
Heimsborgarar
Heston, Charlton
Hugburður
Hærværk
Højgaard, Per

I
Ineptus
Innsavningartiltøk
Inntøkur
Internet
Ipod
Isaksen, Jógvan

Í
Ítróttaferðir
Ítróttafrásagnir
Ítróttaúrslit

J
Jacobsen, Tórbjørn
Jagger, Mick
Jakobsen, Ruth Djurhuus
JFK
Johannesen, Johnsigurd
Johnson, Hiram
Jolly Cola
Journalistar
Journalistskúli
Jónsson, Todi

K
Kan du danse?
Kanal 5
Karsh, Yousuf
Kappingar
Karaktermorð
Kekenia
Kelda
Kenslur
Ketil
Keypiorka
Kirkja
Kjak
kjak.fo
Kjakevni
Kjaksiður
Kjakstaður
Kjaktorg
Knívur
Kommunikationsprisen
Kongekabale
Kríggj
Kringvarp Føroya
Kringvarpsgjald
Kringvarpslóg
Kringvarpsstýri
Kruse, Birgir
Kunning
Kunningartøkni
kvinna.fo

L
Lesarabræv
Levinson, Barry
Lindin
Lívsstarv
Loyvishavari
Lýsingafyritøkur

Lýsingamarknaður
Lýsingar
Løgmaður
Løgregla
Løgting

M
Málbólkur
Marknaðarføring
McCarthy, Joseph R.
Megafon
Menningarlond
Mentan
Merkið
Miðeystur
Miðil
Miðlaráðið
Mikkelsen, Brian
Mikkelsen, Tórður
Mitens, Edvard
Móðurmálið
Mohr, Høgni
Mohr, Poul
Moore, Michael
Morgunsending
Motorsúkkla
Móttakarabólkur
Mp3
Murrow, Edward R.
Myndafólk

N
Narkomál
National Rifle association
Náttarravnar
Natural Born Killers
Negroponte, Nicholas
Netsíður
Nettænastur
Neyðstødd
Nólsoyar Páll
Norðlýsið
Norðurlond
Normar
Norrøna
Norsk Presseforbund
Norsk Telegrambyrå
Novodvinsk
NTB
NTV
Nørrebrúgv

O
O'Connor, T.P.
Oddagrein
Oliver, Jamie
Olsen, Vígdis Hentze
One Laptop Per Child
On-line
Opel
Osbourne, Ozzy
Oyggjatíðindi

P
Pakula, Alan J.
Palleba
Páskir
Persaflógvin
Persónsmál
Petersen, Niels
Petersen, Óli
Petersen, Petur Ove
PlayStation 3
Podcast
Politikari
Politkovskaya, Anna
Prent
Prentarar
Prentmiðstøðin
Pressan
Pressuetikkur
Pressufrælsi
Prix Føroyar
Propaganda
Public relations
Public service
Pull miðlar
Push miðlar
Putin

R
Rana, Jenis av
Rás 2
Rasmussen, Lars Løkke
Rating kanningar
Redaktión
Redaktørur
Reklamufilmar
Reuters
Reyði Krossur
Reykjavík
Rithøvundafelagið
Ritzau
Robeson, Paul
Rokk and roll
Rolling Stones
Roos, Ole
Rópari
Rúsdrekka
Russland
Rættarfundur

S
Sálarfrøðingur
Samfelagsmakt
Samkoma
Samskifti
Samuelsen, Tór Arni
Samvirkin telduspøl
Sankta Pætursborg

Sansirnir
Science fiction
Second life
Senda
Sendiloyvi
Sendistova
Sensur
SIC
Simpsons
Sjálvmundur
Sjónleik
Sjónvarp
Sjónvarpið
Sjónvarpsfeløg
Sjónvarpsrøð
Sjúrðarberg, Borghild
Skaale, Sjúrður
Skjót journalistin
Skotbardagar
Skotvápn
Skúlanæmingar
Skype
Smidstrup, Trine
Sms-boð
Sosialurin
Spiderman
Spin
Sponsorar
Spunasmiður
ST
Sticky Fingers
Stone, Oliver
Strok
Stættarstríð
Súðavík
Summarfestivalurin
Summarfrítíð
Syndabukkur
Sýslumaður
Søldarfjørður

T
Talaða orðið
Talufrælsi
Teitur
Teknirøð
Tekstasmiður
Telda
Teldukafé
Teldupost
Telduspøl
Telefyritøkur
Thomsen, Hjørdis
Tíðindabløð
Tíðindagoymsla
Tíðindaleiðari
Tíðindaskriv
Tíðindastova
Tíðindaveitarar
Tíðindi
Tollmyndugleikar
Tónleik
Tónleikaferðir
Tórgarð, Axel
Toyota
Trúboðin
Tulking
Tunis
TV2
TV-avís
Tykisheimur
Týr
Tørvur

U
Ummælari
UNESCO
Ungdómsmentan
Ungdómur
Uppgávur
Upplagstøl
Upplivingar
Uppæling

Ú
Útnyrðingsrussland
Útvarp
Útvarpið
Útvarpsummæli

V
Valevni
Valsending
Valstríð
Ver varsom
Veruleikin
Vevmátingarlistin
Videobond
Víðvarp
Vikublaðið
Vinnuvitan
Vínummæli
Virði
Voice, The

W
Wag the Dog
War of the Worlds
Welles, Orson
Wich, Ole
Winthereig, Øssur
World of Warcraft
Wyman, Bill

Z
Zachariassen, Óluva
Zorro

**FJØLMIÐLAR** er skúlabók, ið viðger dagsins miðlar og við dømum lýsir tann týdning, miðlarnir hava í okkara gerandisdegi.

**FJØLMIÐLAR** er fyrst og fremst ætlað at brúka á miðlabreyt í 10. flokki. Bókin kann tó eisini brúkast á miðnámi og í elstu flokkum fólkaskúlans í føroyskum og í søgu/samtíð.

**FJØLMIÐLAR** leggur upp til at lesa bløðini, lurta eftir útvarpi og hyggja eftir Degi og Viku. Talgildir miðlar, telduspøl og harðskapsfilmar verða eisini umrødd, og nomið verður við pressufrælsi, her og úti í heimi. Kjakevni eru í hvørjum kapitli, og aftast í bókini eru uppgávur til ymsu miðlarnar og viðurskifti, ið knýta seg aftur at teimum.

**Føroya Skúlabókagrunnur 2007**

Birgir Kruse:
**FJØLMIÐLAR**

*Umbróting og uppseting: Ole Wich - www.wichgrafik.dk*
*Perma: Ole Wich - Fotomyndir: Birgir Kruse/Ole Wich*

*Føroya Skúlabókagrunnur*
*Tórshavn*
*1. portalútgáva*
*mai 2007*

*ISBN: 978-99918-0-474-3*

*Føroya Skúlabókagrunnur © 2007*
*Tilfarið er frítt at brúka óbroytt.*
*Kelda skal vera upplýst.*
*Ikki er loyvt at brúka tilfarið til handilsligt endamál,*
*ella í øðrum útgávuformi enn hesum.*